SEV

# Ársfrágreiðing og ársroknskapur 2010




NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
541 705

**Ársfrágreiðing og Ársroknskapur 2010**
Ársaðalfundur 29. apríl 2011
Lagt til rættis: Leivur Hansen, samskiftisleiðari.
Myndir: SEV og onnur
Forsíðumynd: 74 ára gamli Eivin Dam, fyrrverandi linjumaður, fekk heiðurin at klippa seinasta stikkleidningin í Havn niður 14. juli sum lið í miðvísa arbeiðnum hjá SEV at skifta luftlinjurnar kring landið út við jørðkaðalar.

Umbróting, prent og liðugtgerð: Føroyaprent

# Innihaldsyvirlit

**Frágreiðing frá nevndini** . . . . . . . . . . 2

**Árið, ið fór** . . . . . . . . . . 5
Hvat er varandi orka? . . . . . . . . . . 6
SEV og elbilar . . . . . . . . . . 7
Nú verður borað til Selatraðar . . . . . . . . . . 8
Triðja turbinan sett upp næsta heyst . . . . . . . . . . 9
Nú eru 7.300 fjaravlisnir málarar í Føroyum . . . . . . . . . . 9
SEV kann veita bíligastu vindorkuna . . . . . . . . . . 10
Sundsverkið gongur undan . . . . . . . . . . 11
SEV raðfestir heilsu, trygd og umhvørvi høgt . . . . . . . . . . 12
SEV forkunnugar vitjanir . . . . . . . . . . 15
Lágspennings-luftlinjurnar skjótt horvnar . . . . . . . . . . 17
Veðurlagið ávirkaði elframleiðsluna í 2010 . . . . . . . . . . 18
27 feilir á háspenningskervinum í 2010 . . . . . . . . . . 19
Taðing elvdi til kortslutning . . . . . . . . . . 19
Vestmanna- og Oyrarbakkanæmingar treystastir . . . . . . . . . . 20
Grana-verkætlanin vekir altjóða ans . . . . . . . . . . 21
SEV orðað missión, visión og virðir . . . . . . . . . . 23
Bygnaður og leiðsla . . . . . . . . . . 26
Býtisvirkini . . . . . . . . . . 27
Maskinyvirlit pr. 31/12 2010 . . . . . . . . . . 28
Íløgur hjá SEV 1998 – 2010 . . . . . . . . . . 28
Oljunýtslan í tonsum 1988-2010 . . . . . . . . . . 29
Størsti eftirspurningur og installeraður máttur
– meginøkið 1954-2010 . . . . . . . . . . 29
Elframleiðslan fyri alt landið – elverksøkir 2010 . . . . . . . . . . 30
Elframleiðslan í Suðuroy 1940-2009 . . . . . . . . . . 30
Elframleiðsla pr. íbúgva í Føroyum 1970-2010 . . . . . . . . . . 31
Elframleiðslan fyri alt landið 1954-2010 . . . . . . . . . . 31
Døgnlastin fyri meginøkið mikudagin 7. okt 2010 . . . . . . . . . . 32
Leypandi 12 mánaðar framleiðsla
fyri alt landið frá 1985-2010 . . . . . . . . . . 32

**Ársfrágreiðing**
**& ársroknskapur 2010** . . . . . . . . . . 33

Roknskaparátekning . . . . . . . . . . 34
Átekning frá óheftum grannskoðara . . . . . . . . . . 35
Høvuðstøl . . . . . . . . . . 36
Lyklatøl . . . . . . . . . . 37
Leiðslufrágreiðing . . . . . . . . . . 38
Nýttur roknskaparháttur . . . . . . . . . . 40
Rakstrarroknskapur . . . . . . . . . . 42
Kapitalfrágreiðing . . . . . . . . . . 43
Fíggjarstøða 31. desember – AKTIV . . . . . . . . . . 44
Fíggjarstøða 31. desember – PASSIV . . . . . . . . . . 45
Frágreiðing um eginogn . . . . . . . . . . 46
Notur til ársfrásøgn . . . . . . . . . . 47

# Frágreiðing frá nevndini

You can not escape the responsibility of tomorrow by evading it today, ella á føroyskum: Tú rennur ikki undan ábyrgdini av degnum í morgin, um tú smýgur tær undan ábyrgdini í dag. Orðini eigur Abraham Lincoln.

Fyri einum góðum ári síðani samtykti Føroya Løgting Veðurlagspolitikk Føroya. Ein politikkur, sum hevur sín greiða málsetning um, at Føroyar skulu fylgja altjóða ásetingum og minka um útlátið av veðurlagsgassum við 20% til ár 2020. Løgmaður hevur júst váttað, at politikkurin stendur við.

Við methøgum oljuprísi er hesin setningurin meira viðkomandi enn áður. Men samstundis er avbjóðingin eisini størri enn nakrantíð, tí umframt at skula gjalda fyri stórar íløgur, so skal samstundis eisini gjaldast fyri ein metdýran rakstur.

Beinleiðis avleitt av veðurlagspolitikkinum verða víðfevndar og fíggjarliga krevjandi útbyggingar á virkisøkinum hjá SEV.

## Búskaparstøða felagsins

Nógv tann største einstaka útreiðslan í fíggjarætlan SEV er keyp av olju. Í 2010 brúkti felagið áleið 50 mió.kr. meira til oljukeyp enn árið frammanundan. Frá 75 mió.kr. til 125 mió.kr. Í rakstraræltanini fyri 2011, sum bleiv viðtikin á eykaaðalfundi tann 21. desember í fjør, eru avsettar 117 mió.kr. til at keypa olju fyri. Men, sum prísurin á oljuni er í løtuni, so má roknast við eini meirnýtslu uppá uml. 30 mió.kr. til oljukeyp í inniverandi ári. Hetta svarar til lítla helvt av starvsfólkakostnaði felagsins.

Stóru príssveiggini eru trupul at meta um og órógva fíggjarætlanina, og við tíðini sanniliga eisini búskaparstøðu felagsins, tí samanumtikið er oljuprísurin støðugt hækkandi.

Fyri at royna at tálma útreiðslunum hevur nevndin tikið støðu til ein sparikarm á 5 mió.kr. í samtyktu fíggjarætlanini. Ikki av huga, men við ábyrgd móti búskaparstøðuni felagið er komið í. Vit royna í løtuni at tálma íløgurnar eisini. Framtíðar gongdin kemur at gera av, um uppaftur størri inntriv eru neyðug.

Einki er tó at taka seg aftur í, at um verandi oljuprísur stendur við og veksur í komandi tíðum, so verður neyðugt við príshækkingum. Tað ber snøgt sagt ikki til at spara seg burturúr so ógvusligum príshækkingum, sum nú gera um seg á oljumarknaðinum. Vit kenna tað sum eina skyldu móti tykkum eigarum at gera vart við, at tøki peningur felagsins gongur undan við verandi gongd, uttan mun til hvussu nógv verður spart.

Harumframt metir nevndin tað avgerandi fyri fíggjarligu trygdina undir felagnum, at lánibyrðan ikki gerst ov tyngjandi í mun til dagliga raksturin. Felagið hevur sum aðalmál at skipa raksturin so kostnaðarlágan sum til ber, uttan at trygdin verður sett til viks.

Hinvegin kunnu vit gleðast um hjálpina úr erva, tí ikki er ofta, at vindurin og vatnorkan stuðla so væl undir rakstur felagsins sum higartil í ár.

Ein sokallað „Benchmarking" kanning er sett í verk. Hendan vil sammeta okkara rakstur við aðrar samsvarandi fyritøkur. Eins og við uttanhýsis trygdarmetingini sum er gjørd av felagnum, kemur henda at vera eitt amboð hjá felagnum, sum betrar um evnini at hyggja inneftir og samanbera úteftir. Kanningin verður gjørd av óheftum útlendskum serfrøðingi, og rokna vit við at hava úrslitið tøkt um 4 mánaðir.

## Útbyggingar felagsins

Nevndin hevur, hesi bæði árini hon hevur virkað, roynt at greina møguleikarnar fyri útbyggingum innan varandi orku. Vit miða móti at leggja eina endurmetta útbyggingarætlan fyri eigararnar seinni í vár, har fleiri orkumøguleikar vinna fram í ljósið.

Eftir eykaaðalfundin í desember mánað í fjør var tað ynskt, at nevnd og eigarar skuldu gera langtíðaríløguætlan fyri felagið. Tveir fundir hava viðgjørt hetta evni, og hevur nevndin boðað kommununum frá, at fundur verður aftur í mai mánað í ár, har viðgerðin heldur fram.

Nevndin er sera hørm um tvístøðuna, sum tók seg upp í felagsskapinum í sambandi við elpríshækkingina, og vónar, at eigarar og nevnd finna stevið aftur og lyfta uppgávuni í felag. Lítið er at ivast í, at uppgávan er sera stór, og vit eru ikki á nakran hátt ov nógv at lyfta henni. Ásannast má eisini, at búskaparstøða felagsins hevði verið sera, sera trupul, um príshækkingin ikki vann frama.

Tá ið talan er um veitingartrygdina, so er tað okkara sannroynd, at oljuriknu verkini saman við vatnorkuverkunum, eru álit okkara, og so verður tað helst eisini komandi árini. Verandi grundlastmotorar á Sundsverkinum og á Vágsverkinum hava tænt fyri seg, og eiga avloysarar teirra at koyra innan 3 til 4 ár. Hesum íløgum slepst ikki undan komandi árini.

Men samstundis eiga vit eisini at minka sum mest um oljunýtsluna við at effektivisera og minka um nýtsluna og við at útbyggja við varandi orkuloysnunum. Hesar veita føroyska samfelagnum orkutrygd, samstundis sum vit sum samfelag taka altjóða ábyrgd í mun til útlát av veðurlagsgassum.

Vit hava fingið tann framíhjárætt at verja og varða av náttúrugivnum tilfeingi, sum er „fólksins ogn". Hesa uppgávu mugu vit loysa so skynsamt sum til ber og við so avmarkaðum árinum á varandi tilfeingi okkara sum til ber.

Nevndin er samd um, at SEV hevur ómetaligt virði fyri samfelag okkara sum samhaldføst skipan, har øll í samfelagi okkara eru tryggjaði sama orkukostnað uttan mun til, hvussu fjarskotin ella stór og sterk vit eru. Á henda hátt tryggja vit, at allir føroyingar fáa sama lut í okkara felags tilfeingi.



<< *Nevndin í SEV. Aftara rað f.v.: Pauli T. Petersen, Marin Katrina Frýdal og Niels Olaf Eyvindsson. Fremra rað f.v.: Kári E. Jacobsen, Jákup Suni Lauritsen, næstformaður, Páll á Reynatúgvu, formaður, og Steinbjørn O. Jacobsen.*

Hesi orð kennast møguliga einsamøll og ótíðarhóskandi í dagsins ráki, men vit standa við tey.

Velur almenni myndugleikin at bróta verandi bygnað viðvíkjandi orkuframleiðslu, so er neyðugt at byrgja fyri, at føroyska orkutilfeingið fer á útlendskar hendur. Eitt av endamálunum við at gera okkum leysari av oljuni er at hava valdið á orkuframleiðsluni, sum varandi og trygt grundarlag undir føroyska samfelagnum. Á henda hátt gera vit okkara, til tess at tryggja føroyska samfelagnum orkutrygd og kappingarføri í komandi tíðum.

SEV er, saman við Sendistovuni, farið undir eitt miðvíst átak fyri at fáa føroyingin meiri tilvitaðan um elorkunýtslu. Endamálið er at fáa føroysku familjuna og føroyska vinnulívið at veruliga raðfesta orkusparandi loysnirnar.

Megna vit at minka um elorkunýtsluna, minka vit somuleiðis um trýstið á stórum útbyggingum, umframt at vit minka um útlátið av vakstrarhúsgassum.

Vinnumálaráðið, sum varðar av elorkuni, hevur sett ein arbeiðsbólk at gera heildarætlan fyri elorkuøkið í Føroyum. Ætlanin skal fyriliggja á heysti í ár, og heilsar elfelagið hesum arbeiðnum vælkomnum. Felagið hevur longu havt fleiri fundir við bólkin, og vóna vit, at hendan heildarætlanin kann seta kósina fyri, á hvønn hátt øll útbygging á elorkuøkinum skal fara fram nógvu næstu árini.

Nevndin er av teirri áskoðan, at samstundis sum varandi orkuloysnir skulu troytast, er avgerandi, at orkuátøkini í minst møguligan mun gera skaða á fjølbroytta og viðbrekna náttúruríkidømið, føroyingar eiga.

Nógv tann størsti parturin av elorkuútbyggingum innan varandi orku hevur seinastu mongu árini verið vatnorka. Boringin suður ímóti Selatrað er byrjað væl. Eftir ætlanini kemur hesin parturin í rakstur tíðliga í 2013. Samstundis er tilbygging byrjað á Eiðisverkinum, har tann 3. turbinan skal uppsetast.

Kanning av møguligari vatnorkuverkætlan í Norðurstreymoy viðvíkjandi Víkarvatni er gjørd.

SEV fer í 2011 at lýsa og kanna aðrar varandi orkutættir. Serliga verður hugsað um at lýsa og kanna møguleikarnar fyri vindmylluskipan við løðistøð í Hoyvíkshaganum, og samskifti er við Røkt um møguligt samstarv um pumpuskipan í Vestmanna.

Fyrsta útboð innan uppsetan av 3 MW vindorku bleiv framt av Elveitingareftirlitinum í februar mánað. SEV hevði lægstu boðini, men í skrivandi stund hevur Elveitingareftirlitið ikki gjørt av hvør vinnur útboðið.

Innan sjóvarfalsorku hevur SEV stuðlað verkætlanini hjá Fróðskaparsetur Føroya við Knud Simonsen, lektara, har hann hevur kortlagt møguleikarnar kring Føroyar. Fyribils niðurstøða er gjørd, og síggja úrslitini sera spennandi út. SEV fylgir framhaldandi tøkniligu menningini á økinum.

Í fjør vár var kanningin hjá SEV um pumpuskipanir í Føroyum liðug, og niðurstøðan var, grundað á ávísar fortreytir, at aðrir møguleikar eru, sum búskaparliga loysa seg betur, og víst verður á eina løðistøð og mylnulund, sum ætlanin er at gera skótast gjørligt í Hoyvíkshaganum.

Hinvegin meta vit, at tað er rætt at fáa lýst øll viðurskifti viðvíkjandi slíkum pumpuskipanum, og hetta er eisini orsøk til, at vit stuðlaðu seminarinum 'Energilagring i vand', sum varð hildið í Norðurlandahúsinum tann 28. og 29. september 2010.

Granasamstarvið, sum vit hava saman við Dong Energy, heldur fram. Arbeitt verður í løtuni á 4 breytum: veðurforsagnir, vindmyllutøkni, kontrollrúm og elbilar. Talan er um menning á høgum støði, har vit í felag royna at finna ymiskar framtíðarloysnir fyri stýringar av framleiðslu- og brúkaraeindunum, soleiðis at økjast kann sum mest um varandi elframleiðsluna.

Vit eru sera hørm um, at alduorkuverkið ALDA, sum dótturfelagið SeWave stóð á odda fyri, er steðgað. Landsmyndugleikin valdi ikki at stuðla verkætlanini, við tí úrsliti, at EU-stuðulin varð afturtikin. Felagið verður í løtuni gjørt upp og avtikið. Eitt egið føroyskt orkuframbrot er farið fyri bakka.

P/F Fjarhitafelagið, sum SEV eigur 50% av, hevur eina byggiætlan við einari tiltaksveitingarstøð inni á Gøtu í Hoyvík. Ávís mótstøða til støðbyggingina hevur tikið seg upp. Umhvørvisstovan kannar og eftirmetir loyvið, sum tey góvu til byggingina. Tórshavnar

kommuna sum byggimyndugleiki og Umhvørvisstovan samskifta í løtuni um málið.

### Vitjanir og samstarv

Amerkanski sendiharrin í Danmark, Laurie Fulton, var á vitjan hjá SEV í fjør vár.

Somuleiðis var Henrik prinsur á vitjan hjá SEV síðsta summar. Vitjað varð á Mýruverkinum, og táverandi varaløgmaður, Jørgen Niclasen, var við prinsinum. Greitt varð frá um felagið og um leiklutin hjá SEV at náa ásettu málunum í samtykta veðurlagspolitikkinum.

Nevndin skipaði í fjør heyst fyri samstarvsseminari í Vestmanna. Evnið var pumpuskipan. Umframt nevnd og leiðslu felagsins, landsstýrimannin í vinnumálum Johan Dahl, luttóku umboð fyri Sp/f Røkt, Elveitingareftirlitið, Jarðfeingi og Vinnumálaráðið.

Fundur var í fjør summar við Sunda kommunu um vatnorkuútbyggingar, herundir Eiði 2 Suður, og um eina møguliga Víkarvatnsætlan.

Nakrir eigarar hava spurt um íognarviðurskiftini, og víst varð til frágreiðing, gjørd av sakførara felagsins, sum varð framløgd á umboðsnevndarfundi tann 30. apríl 2008.

Samstarvsavtala er gjørd við Landsverk um, hvussu farast skal fram, tá ið leiðingar verða lagdar í landsvegirnar. Avtalan umfatar bæði ásetingar um, hvussu vit samskipa ætlanina og treytirnar fyri, hvussu uppgávurnar verða framdar.

Vinnumálaráðið hevur sett sær fyri, at lógirnar innan sterkstreymsútbúnað og løggilding av elinnleggjarum skulu dagførast, sum m.a. broytir ábyrgdarbýtið soleiðis, at Elnevndin, sum hevur beinleiðis tilvísing til landsstýrismannin, skal varða av øllum hesum økinum. Í hesum sambandi hevur felagið havt ein konstruktivan og virknan leiklut saman við Elnevndini. Tað er av stórum týdningi, at góða støðið í verandi eleftirliti verður tryggjað og varðveitt.

Í Vinnumálaráðnum eru tey í løtuni í holt við at endurskoða landsins treytir og mannagongdir viðvíkjandi útboði og innkeypi. SEV er limur í Byggiharrasamtaki Føroya og sostatt partur av einum serbólki í hesum arbeiðinum. Serbólkurin vegleiðir um bygging og anlegg.

Nevndin hevur umrøtt spurningin um, hvussu arbeiðir hjá SEV, bæði verklig og ráðgevandi, verða boðin út, og fer at gera tað sum er neyðugt til tess at tryggja kapping á øllum økjum, har til ber.

### Starvsfólk

Tann 6. juni í fjør hevði Kári Nielsen úr Vestmanna starvast sum vaktarmaður á Fossáverkinum hjá SEV í 50 ár. Fyri hetta fekk hann fortjenstmedalju úr silvuri frá HM drotning Margrethu, sum varð handað honum á einari móttøku á skrivstovuni í Havn.

Arbeitt hevur verið við at orða missión, visión og virðir hjá felagnum. Saman við uttanhýsis ráðgevum er hetta gjørt soleiðis, at bæði nevnd, leiðsla og starvsfólk hava givið sítt íkast. Arbeiðið er nú liðugt, og faldari gjørdur, sum lýsir orðingarnar og greiðir frá øllum arbeiðinum.

Lýst verður nú eftir nýggjum deildarstjóra til umsitingina, tí at John P. Danielsen, sum hevur røkt hetta starv í 25 ár, hevur sagt upp til 1. juli. Nevndin ynskir at takka honum fyri trúgva og holla tænastu.

### Framleiðsla og rakstur

Generatorhavarí var á størru turbinuni á Fossáverkinum í januar 2010. Harvið mistu vit nakað av framleiðslu í 3 mánaðir, og kostnaðurin av sjálvari umvælingini liggur um einar 4,0 mió. kr. Rør og turbinur á Fossáverkinum eru sandblást og málað í summar. Eisini eru turbinurnar umvældar. Samlað hevur tann kostnaðurin ligið um 13 mió.kr.

SEV harmast óhappið í Vági tann 14. mai í fjør í sambandi við eina yvirrenning úr dagtangaskipanini. Uml. 15 $m^3$ av gassolju fóru á sjógv. Boðað varð frá hendingini, og sløkkiliðið í Vági hevur staðið fyri uppruddingini. Øll oljan varð tikin upp. Samlaði kostnaðurin er uml. 300.000 kr. Neyv frágreiðing er gjørd um hendingina, og nógvar rættandi atgerðir eru settar í verk. Í hesum sambandi játtaði nevndin 1,0 mió.kr. til rættingar og kanningar, m.a. hevur nevndin gjørt av at fáa uttanhýsis kanning av trygdarskipanunum hjá elfelagnum. Hendan er nú liðug, og verða eigarar og almenningur kunnaði í næstum.

Nevndin er als ikki nøgd við áhaldandi oljuóhappini og hevur álagt leiðsluni at leggja størri dent á fyribyrgjandi tiltøk.

Í september mánaða varð umhvørvisleiðsluskipanin á Sundsverkinum góðkend eftir krøvunum í ISO14001 treytunum. Hetta er fyrsta góðkenning av sínum slag í Føroyum.

Ymisk viðlíkahaldsarbeiðir eru gjørd í høgunum, har vatnorkuverkini eru á Mýrunum í Vestmanna og í Botni í Suðuroy.

Ikki slepst heilt undan, at ólag kemur á streymveitingina, og viðhvørt førir hetta til black-out, t.v.s., øll veitingin steðgar. Hetta hendi aftur fríggjakvøldið tann 5. november í meginøkinum. Felagið metir ikki slíkar støður at vera nøktandi fyri eitt nýmótans orkufelag sum SEV.

### Á einum vegamóti

Sum felagsskapur eru vit á einum vegamóti, har tað kann tykjast sum lítið rekur við. Søguliga høgir og hækkandi oljuprísir seta allan heimin undir trýst. Við áløgdum krøvum um at avrika nógv, við ógvuliga avmarkaðum fíggjarligum tilfeingi, tykist tað sum ein ovurhonds avbjóðing. Sum nevnd standa vit tó við ábyrgd okkara, og gera tað vit eru ment at flyta SEV og føroyska samfelagið fram á leið, men uttan eigarans vilja megna vit einki.

Møguliga er tað, tá ið trýstið er størst, at søguligu siðaskiftini vinna frama. Til ein nýggjan dag við nýggjari dagsskrá.

Dagurin í morgin er teirra, sum fyrireika seg í dag. Síðstu orðini vóru lænt úr afrikanskum orðataki.

*Páll á Reynatúgvu, nevndarformaður*
*Apríl 2011*

# Árið, ið fór







*ST-høvuðsborgin í New York.*

# Hvat er varandi orka?

Í dagliga samskiftinum verða nógv hugtøk nýtt, og ikki er altíð samsvar millum fatanirnar av hugtøkunum hjá øllum teimum, sum eru partar av samskiftinum. Ella sagt við øðrum orðum, tað er ikki altíð, at sent verður á somu „bylgjulongd“, sum móttikið verður á.

Soleiðis kann tað eisini kennast við hvørt, tá ið vit luttaka í almennum orðaskifti í orkuspurningum. Fatanin av, hvørjar keldurnar eru, er ikki so greið, men tá ið hugtøkini burðardygg –, koltvíiltufrí – og varandi orka eru á breddanum, kennist tað stundum ikki sørt ørkymlandi, hvat neyvt verður hugsað um.

Á SEV hava vit beinleiðis fingið fyrispurning um, hvussu vit lýsa hugtakið „varandi orka“. Tað gjørdist tá púra greitt, at um nógvu áhugabólkarnir á orkuøkinum nýta egnar ella tillagaðar lýsingar til hetta hugtak, so er skjótt, at alt, samskiftið endar í einum peruvellingi, og sannlíkindini fyri at kunna skilja grundgevingarnar hjá hvør øðrum minka munandi.

Vit fara tí at gera vart við, at ein felags tilvísing finst á hesum økinum.

Í Bonn tann 26. januar 2009 hevur ST orðað eina reglugerð fyri altjóða stovnin fyri varandi orku, stytt IRENA (International Renewable Energy Agency).

Í stovningarsamtyktini stendur m.a. at lesa, at ST ynskir at fremja eina breiða og vaksandi undirtøku fyri brúki av varandi orkukeldum við atliti at burðardyggari menning.

Endamálsorðingin framgongur av grein 2. Har verður nevnt, at hædd skal takast fyri, hvussu varandi orka gevur íkast til 1) umhvørvisvernd, við at avmarka trýstið á náttúrutilfeingið og skógarrudding, serliga tropiska skógarrudding, oyðimarkarnøring og missin av margfeldi av lívi, og til 2) veðurlagsverju o.s.fr.

Í grein 3 er hugtakið lýst soleiðis:

„Í hesari reglugerð er „varandi orka“ at skilja sum allir formar fyri orku, sum verða framleiddir úr varandi orkukeldum á ein burðardyggan hátt, millum annað:

1. bioorka
2. geotermisk orka
3. vatnorka
4. havorka (íroknað er m.a. sjóvarfals-, aldu- og havtermisk orka)
5. sólorka og
6. vindorka.“

Omanfyri nevnda reglugerð er lýst í Føroyum í Kunngerðarblaði B, 2010 Hefti 20 frá 7. juli 2010.

Á SEV hava vit lagt okkum hesar reglur í geyma, og vóna vit, at hetta íkast kann hjálpa okkum øllum, sum á ymiskan hátt varða av á orkuøkinum.

*Mitsubishi iMiEV elbilurin hjá SEV.*




# SEV og elbilar

Ein av stóru avbjóðingunum hjá SEV í framtíðini verður at brynja seg til at veita elbilum grønan streym.

Hetta er eisini partur av Grana-samstarvinum millum SEV og Dong Energy, hvørs endamál júst er at slóða fyri, at meiri varandi orka kann fáast inn á føroyska elnetið.

Elbilar settu av álvara sín dám á 2010 í Føroyum. Fyrst í árinum skipaði elbilabólkurin hjá SEV fyri royndarkoyring við elbilum kring landið. Umbygdu elbilarnir vóru læntir úr Danmark, og bæði kommunur, fyritøkur og einstaklingar fingu høvi at royna teir.

NAHA (North Atlantic Hydrogen Association) er við stuðuli frá NORA (stovnur undir Norðurlandaráðnum) farin undir eina altjóða granskingarverkætlan í øllum trimum londunum í útnorði (Íslandi, Grønlandi og Føroyum) undir heitinum El-Mobility. Endamálið er at fáa so nógva vitan til vega sum gjørligt um, hvussu elbilar roynast á okkara breiddarstigum. SEV er limur í NAHA.

Verkætlanin byrjaði í Íslandi í summar og heldur fram í Føroyum og Grønlandi í 2011. Síðani verður ein felags frágreiðing skrivað og handað Norðurlandaráðnum.

SEV hevur útvegað sær ein elbil av slagnum Mitsubishi iMiEV. Hesin persónbilurin er við í NAHA-tiltakinum í Føroyum saman við einum sama slag bili úr Íslandi. Høvi verður eisini hjá øðrum áhugaðum at royna hesar báðar bilarnar við at venda sær til SEV.

Mitsubishi iMiEV er ein uppruna-elbilur. Hann hevur 67 hk og 16 kWh lithium-ion battarí. Bilurin kann koyra 150 km upp á eina løðing. Hann koyrir frá 0-100 km/t upp á 15,9 sekund og toppferðin er 130 km/t. Løðitíðin við vanligari 220 volt stikkkontakt er 8 tímar. Við snarløðara kann hann løðast upp til 80 prosent upp á einans 30 minuttir. Bilurin vigar 1060m kg og rúmar fýra persónum. Umboð í Føroyum er P/f Ivan Bilar.




Torben V. Johansen, verkætlanarleiðari, vónar og væntar, at teir kunnu handa SEV tunnilin fyrr enn ætlað. Sambært byggisáttmálanum skal tann 8,4 km langi tunniilin vera liðugur fyrst í mars 2013.

# Nú verður borað til Selatraðar

9. September 2010 varð farið undir Eiði 2 Suður verkætlanina, sum fevnir um ein 8,4 kilometrar langan vatnsavningartunnil millum Norðskála og Selatrað.

Tunnilin skal veita meiri vatn til Eiðisverkið og er sostatt liður í royndunum hjá SEV at útvega meiri varandi orku.

Hetta er samstundis størsta útbyggingarverkætlanin hjá elfelagnum í løtuni.

## Takast í nýtslu í 2013

Eiði 2 Suður Samtakið, ið fevnir um tey bæði byggifeløgini MT Højgaard og J&K Petersen, stendur fyri arbeiðnum, sum eftir ætlan skal verða liðugt í mars 2013.

24 mans eru knýttir at tunnilsarbeiðnum. Arbeitt verður í tveimum vaktum, seks dagar um vikuna. Í meðal verða boraðir 30 metrar um samdøgrið, men onkuntíð hava teir verið uppi á 60 metrum.

## 17 mió. kWh aftrat

Við nýggja tunlinum fær Eiðisverkið 17 mió. kWh av vatni aftrat teimum 40 mió. kWh, verkið hevur til taks frammanundan.

Samlaði kostnaðurin av vatntunli, áarinntøkum, útbygging av Eiðisverkinum og eini triðju turbinu verður mettur til umleið 230 mió. kr. Tá er Eiði 2 Norður íroknað.

Føðirørið til triðju turbinuna.



*Her verður nýumvælda 25 ára gamla Robbens tunnilsborimaskinan TBM hjá SEV sett í gongd við Skálagjógv, omanfyri Norðskála. Hon var eisini álitið, tá hinir vatnsavningartunlarnir har norðuri vóru boraðir.*

# Triðja turbinan

## sett upp næsta heyst

Á Eiðisverkinum eru í løtuni tvær turbinur, men ein triðja er á veg.

Í sambandi við Eiði 2 Suður verkætlanina verður Eiðisverkið útbygt 12 metrar norðureftir, so verkið verður ført fyri at hýsa einari turbinu aftrat.

Byggifelagið MT Højgaard stendur fyri arbeiðnum, sum byrjaði í august/september og eftir ætlan skal verða liðugt næsta heyst.

Nýggja turbinan er eins og hinar báðar keypt frá Voith.
Hon er 7,7 MW, meðan tær gomlu eru 6,7 MW hvør.

Ætlandi kemur nýggja turbinan til Føroya í august 2011, og miðað verður eftir at taka hana í brúk í januar 2012.



*Eiðisverkið verður í løtuni útbygt at hýsa triðju turbinuni.*

# Nú eru 7.300

## fjaravlisnir málarar í Føroyum



7.359. So nógvir fjaravlisnir málarar eru nú settir upp kring landið, vísir nýggjasta uppgerðin frá innleggingardeildini á SEV.

Samlaða talið á elmálarum í Føroyum liggur um 24.000, og sostatt verður nú ein lítil triðingur av málarunum avlisin um fjaravlestrarskipanina hjá SEV.

### Tekur tíggju ár

Arbeiðið at taka gomlu málararnar niður og seta teir nýggju og meira framkomnu upp ístaðin byrjaði í 2006, og SEV miðar eftir at avlesa allar málarar í landinum um fjaravlestrarskipanina í 2016.

Tey, ið hava fingið fjaravlisnar málarar kunnu umvegis heimasíðuna hjá SEV síggja sína streymnýtslu og nýtsluna í krónum og oyrum.

Einstaki brúkarin fær eina kotu við atgongd til sína kontu á heimasíðuni. Á henda hátt ber til hjá brúkarunum at fylgja við síni streymnýtslu.

# SEV kann veita **bíligastu vindorkuna**





*Umboð fyri SEV, Effo, Navia og Røkt fylgja spent við upplesingini av tilboðunum.*



*Fundurin er lokin og menn reisa seg aftur frá borðinum – summir fegnari enn aðrir.*

SEV kann veita bíligastu vindorkuna í Føroyum.

Hetta varð greitt, tá tilboðini upp á at gera nýggja vindorku í Neshaga ella á øðrum hóskandi staði vórðu latin upp á skrivstovuni hjá Elveitingareftirlitinum 11. februar 2011.

Sjey tilboð frá trimum feløgum komu inn.

Umframt tvey tilboð frá SEV, vóru fýra tilboð frá sp/f Røkt í Vestmanna og eitt frá P/F Effo og sp/f Navia á Toftum.

## 3 MW

Elveitingareftirlitið undangóðkendi í august 2010 fimm av seks umsøkjarum, men tá ið avtornaði komu tilboð bert frá trimum feløgum.

Útbjóðingin hjá Elveitingareftirlitinum umfataði 3 MW.

SEV hevði bæði bíligasta og næstbíligasta tilboðið. Í fyrra førinum bjóðar SEV sær at selja streym frá trimum 900 KW vindmyllum í Hoyvíkshaganum fyri 40 oyru/kWh.

Í seinna førinum bjóðar elfelagið sær at selja streym frá trimum myllum í Neshaga (har felagið frammaundan hevur fýra myllur) fyri 41 oyru/kWh.

Effo og Navia kunnu lata streym frá trimum myllum í Neshaga fyri 47 oyru/kWh fyrstu fimm árini og 54 oyru/kWh frá 6. til 20. árið.

Tey fýra tilboðini frá Røkt fevndu um Neshaga, Norðihaga í Kvívík, Mittasta Reyn (nærindis verandi myllum hjá felagnum á Mýrunum í Vestmanna) og á Mýrunum.

Her lá prísurin millum ávikavist 51, 49,5, 53 og 54 oyru/kWh.

Sambært stjóranum á Elveitingareftirlitinum, Jógvan Thomsen, vóru øll tilboðini í hægra lagi.

Ella sum hann tók til:

-Eg hevði vónað, at tey lógu røttu megin tey 40 oyruni, sum Røkt fær í dag fyri sína vindframleiðslu.

## Nærlesa tilboðini

Elveitingareftirlitið roknaði við at brúka ein mánaða ella so at kanna og nærlesa innkomnu tilboðini saman við serfrøðingum, áðrenn støða varð tikin til, hvør ið skal framleiða tey trý megawattini.

Ongin avgerð var fallin, tá ið henda greinin varð skrivað.

Sambært útbjóðingartreytunum verður loyvi veitt tí umsøkjara, sum gevur tilboð um „lægsta prís, hevur bestu teknisku loysnina og hvørs virkislýsing verður mett sannførandi og sterk".

Viðvíkjandi teknisku loysnini verður serliga mett um í hvønn mun „ætlanin kann viðføra høga gagnnýtslu av vindorkuni, veitingartrygd og elgóðsku" .

Hetta er fyrstu ferð, Elveitingareftirlitið bjóðar vindorku út, síðani tað varð skipað sum sjálvstøðugur stovnur undir Vinnumálaráðnum í 2008 og fekk ábyrgdina av framtíðar vindorkuútbygginini í Føroyum.

# Sundsverkið gongur undan

SEV-verkið á Sundi er sum fyrsta framleiðsluvirki í Føroyum ISO 14001 sertifiserað.

Hetta hendi 22. september 2010, tá umboð fyri Det Norske Veritas handaði verkinum góðkenningarskjalið.

ISO 14001 er eitt leiðsluamboð, ið skal hjálpa fyritøkum at stýra tilgongdum fram ímóti eini meiri burðardyggari framleiðslu.

Umhvørvisleiðsluskipanin á Sundsverkinum umfatar elframleiðslu, goymslu og bunkring av tungolju.

## Lið í umhvørvisátaki

– SEV hevur sett sær sum mál støðugt at fremja ábøtur á umhvørvisøkinum, og sum lið í hesum hava vit seinastu tvey árini arbeitt miðvíst við at fáa Sundsverkið ISO 14001 góðkent, segði Annika F. Berg, HTU-leiðari á SEV, á samkomu á verkinum í sambandi við handanina av søguliga skjalinum.

– Við hesi skipanini bindur SEV seg til at fremja ábøtur á umhvørvisøkinum við allatíðina at seta sær nýggj mál og virkisætlanir, legði hon aftrat.

Saman við leiðaranum á heilsu-, trygdar- og umhvørvisdeildini á SEV stóðu Páll Hansen, maskinmeistari á Sundsverkinum, og Janet Fríða Johannesen, ráðgevi á Atlanticon, á odda fyri hesum arbeiði við góðum stuðuli frá øllum starvsfólkunum á Sundsverkinum.

## Fyrimunirnir við skipanini

Nýggja leiðsluskipanin hjálpir fyritøkuni at fáa yvirlit yvir umhvørvisárinini frá eitt nú burturkasti, spillvatni, oljunýtslu, rávørunýtslu, vatni, elnýtslu osfr.

Haraftrat er hon eitt gott amboð at eyðmerkja og seta í verk ábøtur, har fokus eisini er á útreiðslueffektivum loysnum.

Hetta merkir, at fyritøkan – umframt at økja vitanina innan burðardygga framleiðslu og minka um dálkingina – eisini kann betra um effektivitetin innanhýsis í fyritøkuni og harvið eisini rakstrarútreiðslurnar.

Eftir ætlanini verður Vágsverkið næsta elverkið hjá SEV, sum verður ISO 14001 sertifiserað.






Dánjal Vang frá Det Norske Veritas handar Jákupi Sørensen, verkmeistara á Sundsverkinum, søguliga ISO 14001 skjalið.



Annika F. Berg, HTU-leiðari, Páll Hansen, maskinmeistari, og Janet F. Johannesen, ráðgevi á Atlanticon.





*Útivið 30 mans arbeiða á Sundsverkinum, ið stendur fyri umleið helvtini av streymframleiðsluni hjá SEV. Teir fingu undir allari tilgongdini innlæring í ISO 14001 skipanina.*

## SEV raðfestir

# heilsu, trygd og umhvørvi høgt

SEV hevur tann 17. desember 2008 orðað Heilsu-, Trygdar- og Umhvørvispolitikk (HTU), sum er alment tøkur á heimasíðuni hjá SEV www.sev.fo og hongur á øllum arbeiðsstøðunum.

## Trygd

SEV er eitt framkomið virki, sum raðfestir trygd og arbeiðsumhvørvi høgt til gagns fyri okkum øll.

### Trygdararbeiðið

Í 2010 hevur Trygdarnevndin á SEV millum annað arbeitt við at fáa til vega nøktandi trygdarútgerð og kunning um, hvussu hon skal nýtast. Skipað hevur verið fyri ymiskum skeiðum, m.a. brunaskeiði og fyrstihjálparskeiði fyri øllum starvsfólkunum hjá SEV. Í hesum sambandi eru keyptir seks hjartastartarar, sum eru settir upp á Vágsverkinum, Fossáverkinum, Sundsverkinum, verkinum á Strond, í Skálabotni og á høvuðsskrivstovuni í Tórshavn. Eisini hevur verið arbeitt við at fáa starvsfólk at siga frá 'nær við óhappum' og øðrum.

### Persónsskaðar

Hóast SEV arbeiðir skipað við trygdini, og visónin er, at ongir skaðar henda, slepst ikki undan, at skaðar kunnu henda. Niðanfyri sæst tal av persónsskaðum, sum hava havt við sær óarbeiðsføri í ein ella fleiri dagar umframt skaðadagin.




*Myndin vísir persónskaðar frá 1996 til 2010, sum eru fráboðaðir Arbeiðseftirlitinum.*

# Umhvørvið

Myndin høgrumegin vísir høvuðsárinini, sum virksemið hjá SEV hevur á umhvørvið í sambandi við framleiðslu av el:

Tann vanliga elframleiðslan fer fram á 13 verkum, sum framleiða eftir tørvi. Av hesum 13 verkunum eru trý stór termisk verk – Strond, Sund og Vágsverkið. SEV hevur seks vatnorkuverk – verkið á Strond, Eiðisverkið, Fossáverkið, Mýruverkið, Heygaverkið og verkið í Botni. Harumframt fimm smáverk, sum elveita Fugloy, Mykines, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun.

SEV hevur harafturat fýra vindmyllur í Neshaga í Eysturoynni. SEV keypir eisini vindorku frá sp/f Røkt, sum hevur tríggjar vindmyllur á Mýrunum í Vestmanna.

### $CO_2$-útlát

Eitt tað størsta árinið á umhvørvið er brenningin av fossilum brennievnum. Størsti parturin av $CO_2$-útlátinum frá virkseminum hjá SEV stavar frá oljunýtsluni til framleiðslu. Harnæst stavar $CO_2$-útlátið frá oljunýtlsuni til upphiting av bæði bygningum og motorum og síðani frá oljunýtslu til flutning.

**Høvuðsárin av virkseminum hjá SEV**




**Útlát av $CO_2$ í 2010**



- Oljunýtsla til upphiting (bygn. og motorar); 536 tons $CO_2$
- Oljunýtsla til flutning; 263 tons $CO_2$
- Oljunýtsla til framleiðslu; 131.116 tons $CO_2$

| | |
|---|---|
| Útlát í alt: | 131.915 tons $CO_2$ |
| Elframleiðsla í alt: | 280.036 MWh |
| Specifik $CO_2$: | 471 g/kWh |

### Fjarhitaveiting

Fjarhitaveitingin á Sundsverkinum var í 2009 5,99 GWh og í 2010 8,97 GWh, hetta merkti at úrtøkustigið (virkningsgradurin) batnaði í 2010 uml. 0,5% í mun til 2009. Sammett við 2008 er úrtøkustigið batnað 2,5%.

### Umhvørvisgóðkenning

| | Sett í gildi |
|---|---|
| Umhvørvisgóðkenning av elverkinum á Sundi | 11. mars 2004 |
| Umhvørvisgóðkenning av bunkringarskipan á Sundi. Ískoyti til góðkenning hjá elverkinum á Sundi. | 23. mars 2006 |
| Umhvørvisgóðkenning av vindmyllum hjá SEV í Neshaga | 14. mai 2004 |

SEV hevur søkt um umhvørvisgóðkenning av elverkinum í Vági og um endurnýggjan av góðkenning av elverkinum á Sundi.





*Myndir tiknar í sambandi við oljuóhappið í Vági 14. mai 2010.*

## Burturkast

Gjøgnum virksemið hjá SEV verður nógv burturkast framleitt. Ein stórur partur av framleidda burturkastinum verður tyrvt og endurnýtt. Eisini verður burturkast sent til serviðgerð, millum annað kemikaliurestir.

Av burturkasti til endurnýtslu er í høvuðsheitum spillolja, sum verður latin IRF. Ein annar stórur partur er jarn og metal.




*Myndin vísir yvirlit yvir burturkast frá 2008 til 2010.*




*Myndin vísir yvirlit yvir burturkast, sum er farið til endurnýtslu frá 2008 til 2010. Uppgivið í m³*

## Umhvørvisóhapp

Tann 14. mai hendi tíverri eitt oljuútlát frá Vágsverkinum, sum hevði við sær, at olja rann út á Vágsfjørð.

Óhappið hendi í sambandi við feilvísing á automatisku stýrisskipanini til flutning av gassolju millum tangarnar.

Tiltøk vórðu beinanvegin sett í verk til tess at basa oljuútlátinum.

SEV hevur síðani gjørt munandi ábøtur, soleiðis at slík óhapp ikki skulu henda aftur. Millum annað kann nevnast, at nýggj eykaávaringarskipan er sett upp bæði á Vágsverkinum og á Sundsverkinum.

Eisini er vandameting gjørd av teimum termisku verkunum hjá SEV.

## Vandameting

Í tíðarskeiðnum november 2010 til januar 2011 hava COWI A/S saman við starvsfólkum hjá SEV gjørt eina frágreiðing um, hvørjir vandar eru fyri oljuútláti frá teimum termisku verkunum hjá SEV. Arbeitt verður við at innkoyra tey almennu viðmælini frá COWI A/S í dagliga raksturin av verkunum. Eisini verður arbeitt við at skipa raðfestingarlistan soleiðis, at støðugt verður arbeitt fyri at minka um vandan fyri oljuútláti.



*Hákun Djurhuus greiðir frá avbjóðingunum á føroyska orkuøkinum.*



*Henrik prinsur og Páll á Reynatúgvu.*

# SEV forkunnugar vitjanir

SEV hevði í summar fleiri forkunnugar vitjanir.

Síðst í juni vitjaði Henrik Prinsur á Mýruverkinum í Vestmanna í sambandi við Føroyavitjan sína og Margrethu drotning.

SEV-leiðslan við Páll á Reynatúgvu, nevndarformanni, Jákupi Suna Lauritsen, næstformanni, og Hákuni Djurhuus, stjóra, á odda tók ímóti prinsgemalinum.

Prinsurin lurtaði við áhuga eftir frágreiðingunum um Mýruverkið og avbjóðingunum á føroyska orkuøkinum, og hann var ikki sørt hugtikin av at hoyra, at Føroyar liggja á einum 5. plássi í Evropa innan varandi orku.



*Finn Jakobsen greiðir Henrik prinsi frá Mýruverkinum.*

## Boeing áhuga fyri samstarvi

Í juni hevði SEV eisini vitjan av umboðum fyri stóru amerikonsku Boeing-flogverksmiðjuna, ið vildu hoyra um elfelagið og elkervið í Føroyum og framtíðarætlanirnar á hesum øki.

Áhugi teirra fyri føroyska elkervinum var sprottin úr Grana-samstarvinum millum SEV og DONG Energy, sum farið varð undir á sumri 2009 og hvørs endamál er at fáa meira varandi orku inn á føroyska elnetið.

Umframt flogfør og flúgving fæst Boeing eisini við at granska og menna framtíðar orkuskipanir, og í hesum sambandi halda tey Grana-samstarvið vera somikið spennandi og áhugavert, at tey fegin vilja sleppa við í hesa verkætlan.

Enn er kortini ongin avtala gjørd um hetta.

## Eisini avstralskur áhugi

Grana-verkætlanin hevur eisini vakt ans í Avstralia, eftir at hon varð viðgjørd á ráðstevnu á Kanarisku Oyggjunum í vár, sum evropeiski elfelagsskapurin Eurelectric skipaði fyri undir heitinum „Towards a Sustainable Energy Future for island Energy Systems“.

Í hesum sambandi vóru umboð fyri avstralsku orkufyritøkuna PowerCorp eisini í Føroyum í juni 2010 og bjóðaðu seg fram sum samstarvspartnara.

PowerCorp fæst nógv við at integrera vindorku í smáum oyggjasamfeløgum, har vindorka kann gerast størri partur av elframleiðsluni.

Avstralsku gestirnir vóru ovfarnir av, hvussu framkomin føroyska



elskipanin er í mun til skipanirnar í øðrum smáum oyggjasamfeløgum.

Teir fóru heimaftur at hugsa seg nærri um, hvussu teir ítøkiliga kunnu vera til hjálpar í sambandi við ætlanirnar at fáa meiri varandi orku inn á føroyska elnetið.

### Danfoss-eigari á vitjan

Leiðslan á SEV hevði í tveimum umførum í ár eisini høvi at hitta nevndarformannin og høvuðseigaran í donsku Danfoss-fyritøkuni, Jørgen M. Clausen, sum eisini hevur verið stjóri í felagnum og nevndarformaður í Dansk Industri.

Fyrru ferð var um ólavsøkumundið, tá kendi danski vinnulívsmaðurin vitjaði her saman við amerikonsku sendikvinnuni, Laurie S. Fulton, sum gestir hjá Johan Dahl, landsstýrismanni í vinnumálum. Í hesum sambandi varð m.a. skipað fyri tiltaki í Norðurlandahúsinum, ið hevði til endamáls at geva íverksetaraumhvørvinum í Føroyum íblástur.

Seinnu ferð var í sambandi við Vinnudagin í heyst, har Jørgen M. Clausen var ein av gestarøðarunum.

SEV-umboð hittu hann á máli bæði í Havn og í Bø, har tosað varð um ymiskar loysnir innan varandi orku. Danfoss eigur m.a. alduorkuverkið Sea Star í Hanstholm.

Á fundinum í Bø greiddi Terji Nielsen, verkætlanarleiðari á SEV, frá Grana-verkætlanini, og Knud Simonsen, havfrøðingur á Náttúruvísindadeildini, sum við stuðuli frá Granskingarráðnum og SEV seinastu tvey árini hevur kannað møguleikarnar at gagnnýta sjóvarfalsorku í elhøpi, greiddi frá kanningunum higartil.



*Alan Longworthy og Martin Baart frá PowerCorp saman við Terja Nielsen, verkætlanarleiðara á SEV.*



*Finn Jakobsen, Jørgen M. Clausen og Hákun Djurhuus.*


*Á Tvøroyri eru nakrar fáar lágspennings-luftlinjur eftir at taka niður.*


*Gjørt verður klárt at taka stikkleidningin á Hoyvíksvegi 43 niður.*


*Eivin Dam klippur niður síðsta stikkleidningin inn til hús í Havn.*

# Lágspennings-luftlinjurnar **skjótt horvnar**

Nú eru skjótt ongar lágspennings-luftlinjur eftir í føroyska landslagnum.

Tvøroyri er eitt av seinastu plássunum í landinum, sum framvegis hevur luftlinjur. Alla aðrastaðni eru hesar linjurnar skiftar út við jørðkaðalar.

Sambært tíðarætlanini hjá rakstrardeildini á SEV verður ongin lágspennings-luftlinja eftir í 2013.

## Byrjaði eftir jólaódnina

Arbeiðið at skifta luftlinjurnar út við kaðalar byrjaði í áttati-árunum, og eftir jólaódnina í 1988 varð ferð av álvara sett á arbeiðið.

Ódnin fór somikið illa við bæði lágspennings- og háspennings-linjunum, at neyðugt var at endur-nýggja stóran part av elkervinum.

Veitingartrygdin, persónstrygdin og umhvørvisatlit hava eisini havt sína ávirkan á avgerðina um at leggja kaðalar ístaðin fyri at byggja nýggjar luftlinjur í býum og bygdum.


*Linjumenn hjá SEV. F.v.: Rabah Benbakoura, Jón Nielsen, leiðari á rakstrardeildini hjá SEV, Kristian Thorleifsson, Eivin Dam, fyrrv. linjumaður, og Trygvi Samuelsen.*

## Ongin stikkleidningur eftir

Í Havn varð síðsti stikkleidningum frá luft- ella høvuðslinjunum inn til sethús og bygningar tikin niður 14. juli 2010 á Hoyvíksvegi 43.

74 ára gamli fyrrverandi linjumaðurin hjá SEV, Eivin Dam, fekk heiðurin at klippa teymin niður. Hann varð við saksi í hond lyftur upp í eini lyft at útinna søguligu uppgávuna. Eivin starvaðist hjá SEV í sløk 45 ár. Hann gavst, tá hann fylti 67.

Eftir at stikkleidningurin var tikin niður, varð eisini tað, ið eftir var av høvuðslinjuni við Hoyvíksvegin, beint burtur, og harvið hvarv so eisini síðsta luftlinjan í høvuðsstaðnum.

## Leggja eisini 10 og 20 KV kaðalar

Arbeiðið at leggja 10 og 20 KV háspenningskaðalar millum bygdir er eisini komið væl áleiðis. Miðað verður eftir at koma á mál við hesum arbeiði um 6-7 ár.

Kaðalarbeiðið verður gjørt í neyvum samstarvi við lands- og kommunumyndugleikarnar í teimum økjum, har arbeitt verður.



# Veðurlagið ávirkaði elframleiðsluna í 2010

Óvanliga lítið avfall og vantandi vindur, saman við óhappum og nógvum viðlíkahaldsarbeiði, høvdu við sær metstóra framleiðslu og oljunýtslu á termisku verkunum.

Samlaða elframleiðslan í 2010 var upp á 280,4 mió. kWh ella 1,7% størri enn í 2009.

Í meginøkinum (Norðoyar, Eysturoy, Streymoy, Vágar og Sandoy) vaks framleiðslan 2,2%, meðan framleiðslan í Suðuroy fall 2,3%.

Framleiðslan á termisku verkunum var metstór. Vøksturin var upp á 18,6% í mun til 2009.

## Oljumet

Sundsverkið framleiddi uml. 62,5% av samlaðu elframleiðsluni hjá SEV í fjør ímóti 45% í 2007, sum er besta árið til varandi orku higartil. Hetta hevði við sær eina metstóra oljunýtslu upp á 35.250 tons.

Elframleiðslan frá vatnorkuverkunum var upp á tilsamans 67,4 GWh – t.e. eitt fall upp á 27,1% samanborið við árið fyri.

Framleiðslan úr vindorku fall 9,5% í mun til 2009.

## Fleiri orsøkir

Sambært framleiðsludeildini á SEV vóru fleiri orsøkir til stóru afturgongdina í elframleiðsluni úr varandi orku.

Í fyrsta lagi var 2010 eitt óvanliga turt ár, sum m.a. hevði við sær eina minni framleiðslu í Botni í Suðuroy upp á 23,9% í mun til 2009.

Í øðrum lagi elvdu umfatandi generatorskaðar á Fossáverkinum í Vestmanna til munandi minni framleiðslu.



<< *Sundsverkið stóð fyri 62,5 prosentum av elframleiðsluni hjá SEV í 2010 og setti samstundis met í oljunýtslu.*

Harumframt høvdu umfatandi umvælingar- og viðlíkahaldsarbeiði á Fossáverkinum við sær, at turbinurnar á verkinum vóru óvirknar frá 1. mai til 21. desember, tá Fossá 2 kom í rakstur aftur. Hin turbinan verður væntandi klár á páskum 2011.

## Turbinurnar tiknar sundur

Umvælingararbeiðið fevndi m.a. um at sandblása og mála stóru vatnrørini. Hesum arbeiði stóð fyritøkan Solid Vedlikehold í Bergen fyri.

Gjøgnumgongdina av turbinunum hevði Voith um hendur.

Teir tóku hvønn einasta mekaniska lut í turbinunum sundur og sendu teir á serverksmiðju í Norra, áðrenn teir vórðu settir saman aftur. Samstundis varð gamli turbinuregulatorurin frá 1955 á Fossá 2 skiftur út við ein nýggjan elektroniskan regulator.

Gomlu rørbrotsventilarnir á Fossá 1 og 2 vórðu somuleiðis skiftir út við nýggjar, og generatorurin á Fossá 2 varð umbygdur til statiska magnetisering.

# 27 feilir

## á háspenningskervinum í 2010

27 ferðir var órógv á háspenningskervinum í 2010. Hetta er lægsta tal av feilum, síðani rakstrardeildin á SEV fór undir at skráseta feilir á háspenningskervinum.

Lækkandi talið av feilum skal síggjast í ljósinum av nógva og miðvísa viðlíkahaldsarbeiðinum seinastu árini í strembanini eftir at koma so nær nullinum sum til ber.

*Talvan vísir býtið av feilsløgum gjøgnum árið.*




# Taðing elvdi til kortslutning

Sum sæst á lagkøkumyndini kunnu mangar natúrligar orsøkir vera til órógv á streymveitingini.

Men onkur heldur ónatúrlig kann eisini stinga seg upp viðhvørt, sum henda lítla søgan er dømi um:

Ein leygardag seinnapart fór streymurin brádliga til Kollafjørð, Norðradals og Syðradals.

Neyðugt varð hjá SEV at senda fólk í fjøllini at leita eftir feilinum.

Komið varð fram til, at taðað var framvið landsvegnum á Norðradalsskarði við tí úrsliti, at mykja var sproytað upp á isolatorar og linjur.



*Tilvildarlig mynd av taðing. (Mynd: Umhvørvisstovan)*

Hetta gjørdi, at kortslutningur kom í.

Neyðugt var at fáa hjálp frá sløkkiliðnum í Kvívík til at reinsa mykjuna av aftur linjustrekkinum, áðrenn øll hálvanannan tíma seinni høvdu fingið streymin aftur.

Tá slíkt hendir, er sera umráðandi, at fólk gera vart við seg, so lættari verður at finna feilin og streymveitingin kann fáast í rættlag aftur sum skjótast.

# Vestmanna- og Oyrarbakkanæmingar **treystastir**





*9.B á Felagsskúlanum á Oyrarbakka saman við Kristianu Rein, orkuráðgeva.*

*Kristiana Rein handar Áka Olsen, umboði fyri 9. B á Oyrarbakka skjalið, ið sigur, at flokkurin er vinnari av kondisúkklukappingini 2011. Aftanfyri stendur ein stoltur flokslærari, Tanja Ejdesgaard, og lýður á.*



9. b í Vestmanna skúla og 9. b á Felagsskúlanum á Oyrarbakka vunnu kondisúkklukappingina millum allar 9. flokkarnar í Føroyum í ávikavist 2010 og 2011.

Kappingin er liður í elevnisdegnum, sum flokkarnir hava á SEV í vetrarhálvuni undir leiðslu av orkuráðgevanum Kristionu Rein.

Allir næmingarnir fáa í hesum sambandi høvi at royna seg á kondisúkkluni, har kappast verður um at súkkla flest kilowatttímar inn á súkklubarometrið.

9.b. í Vestmanna súkklaði tilsamans 0,231 kWh (0.0178 kWh í miðal fyri hvønn næming), meðan 9.b á Oyrarbakka súkklaði tilsamans 0,206 kWh (0.0137 kWh í miðal fyri hvønn næming).

Um sami prísur skuldi verið latin fyri hesa orkuna, sum brúkarin letur fyri elorkuna frá SEV, høvdu Vestmanna-næmingarnir fingið 34 oyru fyri sína framleiðslu, meðan næmingarnir á Oyrarbakka høvdu fingið 23 oyru fyri orkuna, tey fingu vundið burturúr sínari súkkling.

Vinningurin hjá báðum flokkum var ein túrur á Hvonn í Havn at eta pizza og sodavatn við ísi omaná.

## Ráðgeva eisini øðrum

Tað eru tó ikki bert skúlanæmingar, ið fáa orkuundirvísing á SEV í vetrarhálvuni.

Í september í fjør vitjaði ein flokkur av Heilsuskúla Føroya ein fyrrapart á SEV, har fyrilestur var um orkuráðgeving og elorkunýtslu í húsarhaldinum sum heild.

Í oktober vitjaði ein flokkur av bilsmiðum á Tekniska Skúla í Havn í somu ørindum, og í november vitjaði orkuráðgevin hjá SEV á Tekniska Skúla í Klaksvík.

Í sama mánaða varð eisini skipað fyri einum elorkudegi fyri 20 fólkaskúlalærarum úr øllum landinum.

Orkuráðgevingin hevur eisini eftir áheitan vitjað nakrar barnagarðar í vetur.

## Eisini telefonráðgeving

Nógv fólk venda sær eisini um telefon til orkuráðgevan at biðja um ymisk ráð.

– Serliga í januar og februar ringja fólk at spyrja um alt møguligt, serliga um elnýtsluna, í sambandi við at elrokningin verður send brúkarum í januar, sigur Kristiana Rein, orkuráðgevi.

Umleið hálvthundrað fólk ringdu í hesum ørindum hvønn av teimum báðum mánaðunum, og eini 30 fólk læntu elorkumátara frá SEV í januar og februar. Hetta ber eisini til aðrar tíðir á árinum, alt eftir um og tá teir eru tøkir.

Nógv tilfar er eisini sent í postinum til fólk, ið hava havt eitthvørt at spyrja um, sigur Kristiana Rein.

*9.b í Vestmanna skúla avmyndaður saman við m.a. skúlaleiðslu, lærarum og umboðum fyri SEV.*



*Frá ráðstevnuni í Las Palmas.*

# Grana-verkætlanin

## vekir altjóða ans

ES eigur at geva sær størri far um serstøku avbjóðingarnar hjá smáum, fjarskotnum oyggjasamfeløgum og læra av teirra loysnum, heldur aðalskrivarin í Eurelectric, Hans ten Berge.

Umboð fyri SEV vóru í mai á altjóða ráðstevnu í Las Palmas á Kanarisku Oyggjunum, har evnið var „Towards a Sustainable Energy Future for Island Energy Systems".

Hetta var triðja ráðstevnan av sínum slag, sum evropeiski elfelagsskapurin Eurelectric skipaði fyri, men fyrstu ferð SEV var við. SEV hevur atgongd til hesar ráðstevnur umvegis atlimaskap sín í felagsskapinum hjá donskum elfeløgum, Dansk Energi.

Ráðstevnan varð fyriskipað í samráð við NESIS (Network of Experts on Small Isolated Systems), sum er ein deild undir Eurelectric.



*Terji Nielsen, verkætlanarleiðari á SEV, stóð sjálvur annar fyri framløguni av Grana-verkætlanini.*



*Hans ten Berge, aðalskrivari í Eurelectric, var sera hugtikin av Grana-verkætlanini.*



Føroysku luttakararnir á ráðstevnuni hómast her á aðru røð: Hákun Djurhuus, stjóri, John P. Danielsen, fíggjarstjóri, og Terji Nielsen, verkætlanarleiðari.

Endamálið hjá NESIS er at viðgera spurningar og loysnir í sambandi við smærri fjarskotnar elskipanir, sum ikki eru tengdar at elkervinum inni á meginlandinum.

## Grana-verkætlanin vakti ans

Millum mongu framløgurnar í Las Palmas var ein um føroysku-donsku Grana-verkætlanina, sum teir báðir, Terji Nielsen, verkætlanarleiðari á SEV, og Mikkel Windof, verkætlanarleiðari í DONG Energy, stílaðu fyri undir heitinum „Faroe Islands Project for high penetration of Renewable Energy with Smart Grid Technologies“.

Verkætlanin, sum SEV og DONG Energy fóru undir í 2009, hevur til endamáls at menna og harvið fáa meiri varandi orku inn á føroyska elnetið. Samstundis verður miðað eftir, at samstarvið eisini skal slóða fyri framtíðar alheims loysnum á elorkuøkinum.

Framløgan av Grana-verkætlanini vakti miklan ans millum teir 300 áhoyrararnar. Fleiri viðmerkjarar gjørdu vart við og fegnaðust um, at verkætlanin samsvarar við royndirnar hjá Eurelectric at stuðla uppundir burðardyggar orkuloysnir í smáum oyggjasamfeløgum í Evropa og aðrastaðni í heiminum.

## Brúk er fyri dialogi

Aðalskrivarin í Eurelectric, Hans ten Berge, fegnaðist um ráðstevnuna og staðfesti, at neyðugt er við dialogi millum politikarar og myndugleikar í oyggjasamfeløgunum og tey, ið leggja politikkin í ES til rættis:

– Higartil hava vit í alt ov lítlan mun givið okkum far um serstøku avbjóðingarnar hjá oyggjasamfeløgunum og spennandi loysnunum, tey arbeiða við, og sum eisini kunnu gagna okkum, segði Hans ten Berge m.a. í røðu síni.

## Benchmark

Avbjóðingarnar at reka elkervið í fjarskotnum oyggjasamfeløgum kunnu ikki samanberast við tey stóru elkervini, og tí arbeiðir NESIS í løtuni m.a. við eini benchmark (samanbering) millum sambærilig samfeløg.

SEV luttekur í hesum arbeiði, sum fer at geva eina mynd av, hvussu vit standa okkum samanborið við onnur líknandi samfeløg, tá tað m.a. kemur til veitingartrygd, góðsku og kostnað fyri hvønn kilowatttíma.

# SEV orðað missión, visión og virðir




Leiðsla og starvsfólk í SEV hava í felag orðað missión, visión og virðir sum grundarlag undir øllum arbeiði í felagnum.

Startskotið til hetta kom fram í fyrilestri, sum Hákun Djurhuus, stjóri, helt á starvsfólkafundi fyri góðum ári síðani. Samstundis boðaði hann frá, at farast skuldi undir arbeiðið beinanvegin, og at tað skuldi verða liðugt fyri summarfrítíðina í fjør.

Hetta eydnaðist eisini, og í heyst varð skjalið í snøggari, prentaðari útgávu flýggjað øllum teimum stívliga 150 starvsfólkunum til áminningar. Eisini er ein plakat gjørd, ið hongur uppi á øllum arbeiðsplássum hjá SEV kring landið.

Talan er um eitt stýringsamboð, ið skal brúkast sum kumpass at navigera eftir – bæði mótvegis hvør øðrum sum starvsfeløgum og ikki minst okkara viðskiftafólkum, tá ið um røkt og tænastuveitingar ræður. Missiónin sigur, hví vit eru her, visiónin hvagar vit ítøkiliga ætla okkum og virðini, hvussu vit síggja okkum og hvat ið er berandi í dagliga virki okkara.

Missiónin hjá SEV er at tryggja samfelagnum elmegi við høgari góðsku fyri samhaldsfastan prís og á burðardyggan hátt.

Visiónin er, at SEV framhaldandi vil vera lívæðrin í samfelagnum. Felagið vil ganga á odda í strembanini at menna eitt samfelag, sum byggir á varandi orkukeldur. Týdningarmestu virðini í dagliga virksemi okkara eru Samstarv, Eldhugi, Virðing (stuttstavað SEV).

Nevndin í SEV, sum eisini hevur verið við í arbeiðnum, viðurkennir, at orðingin av felags samleikanum millum starvsfólk, leiðslu og eigarar er ein fortreyt fyri, hvussu livilig fyritøkan er og fyri víðari menningini av SEV.

### Starvsfólkatiltak 4. juni vesturi í Vágunum

Virðir skulu áhaldandi røkjast, so at vit altíð hava nakað at halda okkum til, sum eyðkennir okkum í øllum okkara virki. Hetta verður millum annað gjørt við at skipa fyri ymsum tiltøkum, har arbeitt verður við virðunum. Fyrsta tiltakið av hesum slagi varð fyriskipað á starvsfólkadegnum 4. juni 2010 í samstarvi við fyritøkuna Coast Zone. Útgangsstøðið vóru virðisorðingarnar, og síðani varð arbeitt við ymsum uppgávum. Samanumtikið ein frálíkur dagur, fullur av avbjóðingum og upplivingum.

### Starvsfólkadagur 30. november í Kelduni í Skálabotni

Árligi starvsfólkadagurin varð hildin í rúmligu og vælegnaðu fundarhølunum hjá Kelduni í Skálabotni 30. november. Á starvs-



*Kajakkrógvingá Sørvágsfirði.*

fólkadegnum kunnar leiðslan m.a. starvsfólkini um virksemið seinasta árið og um framtíðarætlanir.

Hákun Djurhuus, stjóri, og Finn Jakobsen, tekniskur deildarstjóri, greiddu vegna leiðsluna frá, hvat ið er komið á skaftið í ár og ætlaðu framtíðar útbyggingingunum. Eisini varð nomið við fíggjarætlanina fyri 2011 og fíggjarstøðuna hjá felagnum.

### Starvsfólkafelagið

Á starvsfólkadegnum um heystið heldur starvsfólkafelagið aðalfund. Nevndin í starvsfólkafelagnum kunnaði starvsfólkini um virksemið seinasta árið og framtíðarætlanir. Nevndarlimir í starvsfólkafelagnum eru Otto West, Sjanna Hentze, Karstin Hansen og Anna Vang. Starvsfólkafelagið skipaði í 2010 millum annað fyri føstulávintshaldi og jólaborðhaldi.

### Virðislønir 2010

Páll Hansen, maskinmeistari á Sundsverkinum, fekk "Ársins herðaklapp 2010". Grundgevingin fyri at geva honum herðaklappið var soljóðandi:

*"Páll er ein eldsál. Tá ið hann fer í gongd við nakað, gongur hann uppí hetta við lív og sál. Onki er gjørt hálvt. Eitt dømi um hetta er stóri og týdningarmikli innsatsur hansara í sambandi við at fáa sett í verk umhvørvisleiðsluskipanina ISO 14001 á Sundsverkinum. Tað er av avgerandi týdningi at hava fólk sum hann í slíkum arbeiði. Uttan tað hevði tað ikki eydnast – ella í øllum førum ikki eydnast líka væl. Páll eigur soleiðis ein stóran leiklut í, at SEV – ella Sundsverkið – sum fyrsta framleiðsluvirki í Føroyum hevur fingið sertfisering, og er hetta í tráð við missiónina og visiónina hjá SEV ".*

Eisini fingu Robert Joensen og Bogi Wardum viðurkenning fyri at vísa umsorgan og ábyrgd. Hetta er ein virðislønarskipan, ið trygdarnevndin hjá SEV hevur sett í verk fyri trygdarfrágreiðingar, sum kunnu geva munandi batar á trygdarviðurskifti felagsins. Bogi Wardum fekk virðisløn fyri at hava boðað frá eini vandamiklari støðu, og Robert Joensen vann lutakastið millum tvær innkomnar trygdarfrágreiðingar um eitt gávukort til ein døgurða.



*11. juni fekk Kári Nielsen, vaktmeistari á Fossáverkinum í Vestmanna, handaða fortjenstmedalju úr silvuri frá Margrethu drotning.*

### Fyrilestrar

Hákun Djurhuus helt fyrilestur um Víkarætlanina, og Terji Nielsen, verkætlanarleiðari, greiddi frá kanningum hjá einum arbeiðsbólki hjá SEV av møguleikunum fyri pumpuorkuskipanum og vindorkuútbyggingum í Føroyum. Dagurin endaði við einum sera lívligum og innihaldsríkum fyrilestri, sum ein vælupplagdur gestarøðari úr Klaksvík, Niklas Heri Jákupsson, rúnarbant áhoyrararnar við í útivið hálvanannantíma undir hóskandi og beinrakna heitinum „Lívsgleði", og har stutti og einfaldi boðskapurin var: Verið positiv!

### Starvsfólk støðast

Okkurt bendir á, at SEV er eitt arbeiðspláss, har starvsfólk trívast. Hetta avdúka hagtølini viðvíkjandi starvsaldri. Sambært teimum hava ikki færri enn 38 starvsfólk ella 24,5% av samlaða starvsfólkahópinum verið í starvi hjá Elfelagnum í meira enn 25 ár. Meðalstarvsaldurin var í 2010 beint omanfyri 15 ár.

### Kári Nielsen fortjenstmedalju frá drotningini

Á samkomu á høvuðsskrivstovuni hjá SEV í Havn 11. juni fekk Kári Nielsen, vaktmeistari á Fossáverkinum í Vestmanna, handaða fortjenstmedalju úr silvuri frá Margrethu drotning.

Hákun Djurhuus, stjóri, handaði vegna Hennara Hátign Kára

### Merkisdagar í 2010

**Petur Vitalis,** linjuformaður – 25-ára starvsdag 3. jun.
**Hjalmar N. Poulsen,** maskinmeistari – 25-ára starvsdag 1. sep.
**Mannbjørn Vang,** linjuformaður – 25-ára starvsdag 1. okt.
**Bjarki Johannesen,** verkfrøðingur – 25-ára starvsdag 1. okt.
**Magnus við Streym,** linjuformaður – 30-ára starvsdag 11. aug.
**Kári Nielsen,** maskinmaður – 50-ára starvsdag 6. jun.













medaljuna í sambandi við, at hann 6. juni hevði verið samfull 50 ár í starvi hjá elfelagnum. Hjástødd vóru umframt leiðslu, nevndarlimir og starvsfólk, eisini familja og vinir hjá 68-ára gamla jubilarinum, sum er tann fyrsti, ið hevur starvast hjá SEV í eina hálva øld.

Fryntligi og fyrikomandi vestmenningurin hevur starvast út í eitt á Fossáverkinum, síðani hann sum 18-ára gamal 6. juni 1960 kom í starv hjá SEV sum vanligur arbeiðsmaður. Seinni kom hann inn í vaktarskipanina í kontrollrúminum á verkinum, fyrst sum avloysari og seinni sum fastur maður.

### SEV vann bronsu í firmakappingini í Flaggdagsrenningini

Í SEV eru fleiri góðir og treystir rennarar, sum av sonnum mugu sigast at ganga uppí sítt strævna




*Teitur Magnusson, Sam Vang, Niels Hansson og Magnus Magnussen*

og krevjandi frítíðarítriv við lív og sál. At hetta ikki bert gagnar teimum, men eisini arbeiðsplássi teirra, kom týðiliga til sjóndar í Flaggdagsrenningini, sum Bragdið skipaði fyri í Havn Flaggdagin í fjør, og har nakrir av okkara fremstu rennarum vóru við. Í firmakappingini fyri menn gjørdist SEV nummar trý og tryggjaði sær harvið bronsu. Teir fýra, ið umboðaðu SEV í hesi kappingini, vóru Sam Vang, Niels Hansson, Teitur Magnusson og Magnus Magnussen. Sam Vang vann eisini bronsu í einstaklingarenningini hjá monnum.

SEV var eisini umboðað í rennikappingini hjá kvinnum.

### SEV-maður føroyameistari í 10 km renning

Á SEV kunnu vit eisini reypa okkum av at eiga føroyameistaran 2010 í 10 km renning hjá monnum. Tað er nevniliga Sam Vang, sum er maskinmeistari á Sundsverkinum, tá hann ikki rennur. FM í 10 km varð avgreitt í allarfagrastu líkindum í Runavík 22. juni, har Sam kom fyrstur á mál. Sam hevur áður luttikið í hesi kapping og hevur fyrr verið nummar tvey, men hesa ferð eydnaðist honum at vinna.

# Bygnaður og leiðsla




*Nevnd og dagliga leiðslan í SEV. Aftara rað f.v.: Hákun Djurhuus, stjóri, Pauli T. Petersen, nevndarlimur, Marin Katrina Frýdal, nevndarlimur, Niels Olaf Eyvindsson, nevndarlimur, og Finn Jakobsen, tekniskur deildarstjóri. Fremrarað f.v.: Kári E. Jacobsen, nevndarlimur, John P. Danielsen, deildarstjóri fyri fyrisitingina, Jákup Suni Lauritsen, næstformaður, Páll á Reynatúgvu, nevndarformaður, og Steinbjørn O. Jacobsen, nevndarlimur.*



# Býtisvirkini

| | Fugloy | Svínoy | Viðoy | Borðoy | Kunoy | Kallsoy | Eysturoy | Streymoy | Vágoy | Mykines | Nólsoy | Koltur | Hestoy | Sandoy | Skúvoy | Stóra Dímun | Suðuroy | **Samtal** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *TRAFOSTØÐIR, TAL* | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 6kV Transformarastøðir | 1 | | | 2 | | | | | | | | | | | | | | **3** stk. |
| 10kV Transformarastøðir | | 1 | 6 | 32 | 3 | 7 | | 64 | | | 1 | | | 16 | | | 51 | **181** stk. |
| 20kV Transformarastøðir | | | | 2 | | | 110 | 75 | 29 | | | | 1 | | | | | **217** stk. |
| 60kV Transformarastøðir | | | | 1 | | | 2 | 4 | | | | | | | | | | **7** stk. |
| **Samtal økir** | **1** | **1** | **6** | **37** | **3** | **7** | **112** | **143** | **29** | | **1** | | **1** | **16** | | | **51** | **408 stk.** |
| *TRANSFORMARAR, TAL* | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 6kV Transformarar | 2 | | | 4 | | | | | | | | | | | | | | **6** stk. |
| 10kV Transformarar | | 1 | 6 | 38 | 3 | 7 | | 74 | | | 1 | | | 17 | | | 60 | **207** stk. |
| 20kV Transformarar | | | | 5 | | | 128 | 105 | 33 | | | | 1 | 3 | | | 3 | **278** stk. |
| 60kV Transformarar | | | | 1 | | | 3 | 12 | | | | | | | | | | **16** stk. |
| **Samtal økir** | **2** | **1** | **6** | **48** | **3** | **7** | **131** | **191** | **33** | | **1** | | **1** | **20** | | | **63** | **507 stk.** |
| *KAÐALSKÁP, TAL* | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 0,4kV kaðalskáp | 13 | 23 | 79 | 499 | 29 | 30 | 1564 | 2284 | 507 | 7 | 38 | | 10 | 214 | 11 | | 841 | **6149** stk. |
| *LINJUR OG KAÐALAR* | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 60kV linja | | | | 1,02 | | | 37,57 | 42,99 | | | | | | | | | | **81,58** km. |
| 60kV kaðal | | | | 0,09 | | | 13,68 | 14,81 | | | | | | | | | | **28,58** km |
| 20kV linja | | | | | | | 60,29 | 58,55 | 12,21 | | | | | | | | 12,03 | **143,08** km |
| 20kV kaðal | | | | 11,46 | | | 142,99 | 139,40 | 35,90 | | | | 0,56 | 0,63 | | | 4,30 | **335,24** km |
| 10kV linja | | 3,23 | 16,31 | 13,84 | 11,59 | 6,44 | | 5,31 | | | | | | 13,92 | | | 49,71 | **120,35** km |
| 10kV kaðal | | 0,55 | 3,96 | 29,86 | 0,16 | 11,15 | | 67,42 | | | 1,47 | | | 28,21 | | | 58,57 | **201,34** km |
| 6kV linja | 2,19 | | | 7,17 | | | | | | | | | | | | | | **9,36** km |
| 6kV kaðal | 0,17 | | | 0,07 | | | | 0,16 | | | | | | | | | | **0,40** km |
| 0,4kV linja | | | | 0,32 | | | | 0,04 | | | | | | | | | 2,70 | **3,06** km |
| 0,4kV kaðal | 1,10 | 3,86 | 11,34 | 60,60 | 2,64 | 2,96 | 195,03 | 279,03 | 56,76 | 0,55 | 3,38 | 0,38 | 0,90 | 28,45 | 0,88 | 0,05 | 94,13 | **742,04** km |
| *MÁLARAR* | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Fjaravlisnir kWh málarar | 58 | 71 | 265 | 293 | 82 | 115 | 1855 | 2310 | 709 | 52 | 175 | | 43 | 765 | 54 | 2 | 510 | **7359** stk. |
| Ikki fjaravlisnir kWh málarar | 3 | 4 | 9 | 2211 | 2 | 6 | 3407 | 8119 | 853 | 1 | 3 | 2 | 0 | 46 | 0 | 2 | 2359 | **17027** stk. |
| **kWh málarar í alt/øki** | **61** | **75** | **274** | **2504** | **84** | **121** | **5262** | **10429** | **1562** | **53** | **178** | **2** | **43** | **811** | **54** | **4** | **2869** | **24386 stk.** |
| Vøkstur 2010 | 0 | 0 | 2 | 5 | 2 | 1 | 55 | 95 | 15 | 0 | -1 | 0 | 0 | 6 | 0 | 0 | 9 | **189** stk. |

# Maskinyvirlit pr. 31/12 2010

| Stað | Maskina | MW | Hk | Maskintypa | Maskinframleiðari | Drív evni | Ár | Aldur | Tímar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Botnur** | T1 | 1 | 1.360 | Pelton vatnturbina | Voith | Vatn | 1965 | 45 | 176.980 |
| **Botnur** | T2 | 2 | 2.719 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1966 | 44 | 135.504 |
| **Eiðisverkið** | T1 | 6,7 | 9.109 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1987 | 23 | 86.012 |
| **Eiðisverkið** | T2 | 6,7 | 9.109 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1987 | 23 | 80.228 |
| **Neshagi** | M1 | 0,15 | 204 | Vindmylla ( fixed pitch) | Nordtank | Vindur | 1993 | 17 | 107.958 |
| **Neshagi** | M2 | 0,66 | 897 | Vindmylla ( variable pitch) | Vestas | Vindur | 2005 | 5 | 35.993 |
| **Neshagi** | M3 | 0,66 | 897 | Vindmylla ( variable pitch) | Vestas | Vindur | 2005 | 5 | 37.435 |
| **Neshagi** | M4 | 0,66 | 897 | Vindmylla ( variable pitch) | Vestas | Vindur | 2005 | 5 | 31.434 |
| **Skopunarverkið** | M1 – M3 | 1,826 | 2.483 | 4-T | Mercedes og Deutz | Gassolja | 1984 | | |
| **Småverk** | | 1,7 | 2.311 | 4-T | Deutz, Mercedes, Perkins | Gassolja | | | |
| **Strond** | M2 | 2,3 | 3.127 | 4-T KV 12 SS | Mirrleese Blackstone | Gassolja | 1965 | 45 | 78.783 |
| **Strond** | M3 | 3,6 | 4.895 | 4-T 12 M 453 K | Krupp Mak | Gassolja | 1982 | 28 | 44.717 |
| **Strond** | T1 | 1,4 | 1.903 | Francis vatnturbina | Sulzer Hydro | Vatn | 1998 | 12 | 39.440 |
| **Sundsverkið** | M1 | 7,85 | 11.013 | 4-T 9M43C | Caterpillar/MaK | Tungolja | 2001 | 9 | 36.715 |
| **Sundsverkið** | M2 | 7,85 | 11.013 | 4-T 9M43C | Caterpillar/MaK | Tungolja | 2004 | 6 | 31.511 |
| **Sundsverkið** | M3 | 5,7 | 7.750 | 4-T KV16MAJOR | Mirrleese Blackstone | Tungolja | 1978 | 32 | 69.151 |
| **Sundsverkið** | M4 | 12,4 | 16.859 | 2-T 12 L55 GSCA | B&W Götaverken | Tungolja | 1983 | 27 | 147.898 |
| **Sundsverkið** | M5 | 12,4 | 16.859 | 2-T 12 L55 GSCA | B&W Götaverken | Tungolja | 1988 | 22 | 121.391 |
| **Tvøroyri** | M1 | 2 | 2.719 | 4-T | Nohab | Gassolja | 1973 | 37 | 81.520 |
| **Vágsverkið** | M1 | 2,7 | 3.671 | 4-T 9 M 453 | Krupp Mak | Tungolja | 1983 | 27 | 106.206 |
| **Vágsverkið** | M2 | 2,7 | 3.671 | 4-T 9 M 453 | Krupp Mak | Tungolja | 1983 | 27 | 108.176 |
| **Vágsverkið** | M3 | 4,32 | 5.874 | 4-T 9M32C | Caterpillar/MaK | Tungolja | 2004 | 6 | 40.717 |
| **Vestmanna** | Fossá 1 | 2,1 | 2.855 | Pelton vatnturbina | Maier | Vatn | 1953 | 57 | 201.878 |
| **Vestmanna** | Fossá 2 | 4,2 | 5.710 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1956 | 54 | 312.340 |
| **Vestmanna** | Heygav. 1 | 4,9 | 6.662 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1963 | 47 | 201.752 |
| **Vestmanna** | Mýruv. 1 | 2,4 | 3.263 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1961 | 48 | 332.120 |
| | | | | | | | | | |
| **Samlaður máttur:** | | **101 MW** | **137.833 Hk** | | | | | | |

# Íløgur hjá SEV 1998 – 2010

| Íløgur (mió. kr.) | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vatnorkuverk | 35,1 | 43,3 | 13,7 | 8,6 | 8,6 | 0,0 | 0,3 | 0,3 | 0,5 | 4,0 | 27,4 | 41,7 | 46,6 |
| Onnur framleiðsluverk | 0,1 | 1,1 | 5,8 | 30,4 | 18,1 | 52,0 | 18,0 | 20,0 | 2,3 | 2,8 | 5,0 | 3,1 | 2,7 |
| Býtisvirkir | 21,0 | 13,8 | 13,6 | 14,6 | 19,5 | 17,4 | 18,6 | 18,2 | 32,8 | 41,9 | 41,1 | 19,6 | 21,7 |
| Felagsognir | 0,1 | 1,8 | 0,7 | 0,1 | 0,0 | 0,1 | 0,8 | 0,0 | 0 | 0,8 | 0,0 | 0 | 0 |
| Jarðarognir | - | - | 1,5 | -4,8 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0 | 0,0 | 0,0 | 0 | 0 |
| Onnur rakstrargøgn | 1,8 | 2,6 | 1,5 | 2,4 | 1,7 | 2,4 | 2,0 | 3,2 | 2,2 | 2,5 | 3,1 | 5,6 | 5,7 |
| **Tilsamans** | **58,1** | **62,6** | **36,8** | **51,3** | **47,9** | **71,9** | **39,7** | **41,7** | **37,8** | **52,0** | **76,6** | **70,0** | **76,7** |

# Oljunýtslan í tonsum 1988-2010




# Størsti eftirspurningur og installeraður máttur – meginøkið 1954-2010



# Elframleiðslan fyri alt landið – elverksøkir 2010




# Elframleiðslan í Suðuroy 1940-2009



# Elframleiðsla pr. íbúgva í Føroyum 1970-2010




# Elframleiðslan fyri alt landið 1954-2010



# Døgnlastin fyri meginøkið mikudagin 7. okt 2010




# Leypandi 12 mánaðar framleiðsla fyri alt landið frá 1985-2010



# Ársfrágreiðing & ársroknskapur 2010

# Roknskaparátekning

Vit leggja við hesum fram ársfrásøgn fyri felagið fyri 2010. Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini og viðtøkum felagsins.

Tað er okkara fatan, at nýttur roknskaparháttur er hóskandi og tryggjar, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðu og av úrslitinum av virksemi og peningastreymi felagsins.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri aðalfundin, og mælt verður til at góðkenna hana.

Tórshavn, hin 14. apríl 2011

**Nevnd:**

| | | |
|---|---|---|
| *Páll á Reynatúgvu, form.* | *Jákup Suni Lauritsen, næstform.* | *Marin Katrina Frýdal* |
| *Steinbjørn O. Jacobsen* | *Kári E. Jacobsen* | *Niels Olaf Eyvindsson* |
| *Pauli T. Petersen* | | |

**Stjórn:**

*Hákun Djurhuus*

**Fíggjarleiðsla:**

*John P. Danielsen*

# Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til eigararnar av elfelagnum sev**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Elfelagið SEV fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2010 við leiðsluátekning, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn, gjaldførisfrágreiðing og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera eina ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd samsvarandi ársroknskaparlógini. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til, fyri at ársroknskapur kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

## Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til, fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd, hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2010 og av úrslitinum av virksemi og peningastreymi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2010 samsvarandi ársroknskaparlógini.

## Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera eina rættvísandi leiðslufrágreiðing samsvarandi ársroknskaparlógini. Vit hava ikki grannskoðað leiðslufrágreiðingina, men hava, sum ásett í ársroknskaparlógini, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn hin 14. apríl 2011

**NOTA**
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

| | |
|---|---|
| *Hans Laksá* | *Jóannes Olsen* |
| *løggildur grannskoðari* | *skrás. grannskoðari* |

# Høvuðstøl

Allar upphæddir í TDKK

| | 2010 | 2009 | 2008 | 2007 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | |
| Nettosøla | 280.816 | 279.870 | 276.860 | 249.105 | 238.359 |
| Úrslit av vanligum rakstri | 8.021 | 69.282 | 20.752 | 63.795 | 81.992 |
| Úrslit av fíggjarligum postum | -10.139 | -5.210 | -3.533 | -2.293 | -5.847 |
| Úrslit av óvanligum rakstri | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Ársúrslit | -57.783 | 9.257 | -31.138 | 12.036 | 16.217 |
| | | | | | |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Aktiv tilsamans | 1.200.554 | 1.151.024 | 484.126 | 539.325 | 523.545 |
| Flutt til avskrivingargrundarlag | 28.123 | 102.706 | 47.315 | 70.350 | 26.046 |
| Eginogn | 889.131 | 945.563 | 325.987 | 357.125 | 345.089 |
| | | | | | |
| **Peningastreymar** | | | | | |
| Netto peningastreymar frá | | | | | |
| Rakstri | 10.821 | 44.164 | 19.332 | 71.535 | 74.062 |
| Íløgum | -78.826 | -71.856 | -76.613 | -52.038 | -38.410 |
| Fígging | 73.376 | 40.158 | -18.018 | -18.930 | -21.030 |
| | | | | | |
| **Ársins peningastreymar** | **5.371** | **12.466** | **-75.299** | **567** | **14.622** |

# Lyklatøl

| | 2010 | 2009 | 2008 | 2007 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rentabilitetur** | | | | | |
| Renting av eginogn | -6,3% | 1,0% | -9,1% | 3,4% | 4,8% |
| Ognaravkast | 0,7% | 6,0% | 4,3% | 11,8% | 15,7% |
| Yvirskotsstig | 2,9% | 24,8% | 7,5% | 25,6% | 34,4% |
| Umsetningsferð av aktivum | 0,23 | 0,24 | 0,57 | 0,46 | 0,46 |
| | | | | | |
| **Soliditetur** | | | | | |
| Eginognarpartur | 74,1% | 82,1% | 67,3% | 66,2% | 65,9% |
| | | | | | |
| **Onnur** | | | | | |
| Ársverk í miðal | 146 | 153 | 148 | 145 | 145 |

### Útrokning av lyklatølum

Lyklatøl eru roknað út eftir tilmælum frá *Den Danske Finansanalytikerforening*

**Renting av eginogn**

$$\frac{\text{Ársúrslit x 100}}{\text{Miðal eginogn}}$$

**Ognaravkast**

$$\frac{\text{Úrslit av vanligum rakstri x 100}}{\text{Aktiv tilsamans}}$$

**Yvirskotsstig**

$$\frac{\text{Úrslit av vanligum rakstri x 100}}{\text{Nettosøla}}$$

**Umsetningsferð av aktivum**

$$\frac{\text{Nettosøla}}{\text{Aktiv tilsamans}}$$

**Eginognarpartur**

$$\frac{\text{Eginogn ultimo x 100}}{\text{Aktiv tilsamans}}$$

# Leiðslufrágreiðing

## Høvuðsvirksemi

Elfelagið SEV er eitt interkommunalt lutafelag, ið hevur til endamáls at fáa til vega elmegi og býta hana millum íbúgvarnar í limakommununum. Eftir viðtøkum elfelagsins skal endamálið fremjast sambært vinnuligum meginreglum, á búskaparliga tryggum støði og við fyriliti fyri náttúru og umhvørvi. Eftir elveitingarlógini skal SEV (netvirksemið) fíggjarliga hvíla í sær sjálvum, soleiðis at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur.

Allar kommunur í Føroyum eru limir í SEV. Limirnir heftu fram til árslok 2008 bæði fyri skuld felagsins og møguligum rakstrarhalli. Frá 1. januar 2009 heftu kommunurnar einans fyri felagsins skyldum yvirfyri starvsfólkunum.

Frágreiðingin fevnir um virksemið hjá felagnum í tíðarskeiðinum 01.01.10 – 31.12.10.

## Gongdin í virksemi og fíggjarligu viðurskiftunum hjá felagnum

Rakstrarúrslitið fyri 2010 gjørdist eitt hall uppá 57,8 mió. kr. móti einum avlopi uppá 9,3 mió. kr. árið fyri. Tann av aðalfundi felagsins í november 2009 samtykta fíggjarætlanin vísti eitt rakstrarhall uppá 6,6 mió. kr. Men tá ið tað gjørdist greitt, at myndugleiksloyvi ikki fekst til ætlaðu príshækkingina uppá 8 oyru/kWh, varð endurskoðað fíggjarætlan fyri 2010 samtykt á aðalfundi í apríl 2010. Fíggjarætlanin vísti eitt hall uppá 36,6 mió. kr.

Inntøkurnar vóru 280,8 mió. kr. Hettar er uml. 1 mió. kr. meira enn árið fyri, og 4,5 mió. kr. meira enn ásett í fíggjarætlanini. Elsølan, máld í kWh varð at kalla óbroytt í mun til árið fyri. So gott sum øll inntøka felagsins stavar frá elsølu.

Útreiðslurnar vóru áðrenn avskrivingar 282,9 mió. kr. ella 26 mió. kr. meir enn ásett í fíggjarætlanini.

Tað eru serstakliga oljuútreiðslurnar, sum hava økt um samlaðu útreiðslurnar. Meðal oljuprísirnir vóru munandi hægri í 2010 enn mett var, tá tillagaða fíggjarætlanin varð samtykt í apríl 2010. Eftir ætlanini fór oljan at kosta SEV 106,5 mió. kr. Endaligi kostnaðurin var heilar 125,3 mió. kr. Framleiðslan á oljuriknu elverkunum vaks 18,6 %. Tí ávirkar vøksturin í brúktu oljunøgdunum eisini útreiðslurnar nakað.

Aðrar rakstrarútreiðslur til tilfar og tænastuveitingar gjørdust einar 8 mió. kr. størri enn ásett í fíggjarætlanini, og stavar meginparturin av muninum frá óvæntaðum eyka umvælingarkostnaði í sambandi við høvuðsumvæling á Fossáverkinum. Lønarútreiðslurnar vóru áleið, sum ásett í fíggjarætlanini.

Fíggjarpostar, netto vóru 10,1 mió. kr. ella 0,5 mió. kr. hægri enn ásett í fíggjarætlanin. Rentuútreiðslurnar av lánum vóru lægri enn ætlað, orsakað av at lántøkan varð gjørd seinni á árinum enn roknað varð við. Eyka fíggjarútreiðslur uppá 2,1 mió. kr. vóru í sambandi við avgerðina um at avtaka eitt av atknýttu virkjum felagsins.

Avskrivingarhátturin er frá 1. januar 2009 broyttur eftir boðum frá Elveitingareftirlitinum. Ognarvirðini eru munandi broytt frá 1. Januar 2009, og eru avskrivingartíðirnar samstundis fyri flestu ognir eisini munandi longdar. Hettar fer ikki í fyrstani at broyta samlaðu avskrivingarnar munandi, men sum frálíður verður talan um munandi broytingar. Við støði í hesum broytingum verður samlaða avskrivingin í 2010 uml. 55,7 mió.kr.

## Íløgur

Íløgurnar í materiella støðisogn vóru 78,8 mió. kr. Hettar er 29,5 mió. kr. minni enn ásett í fíggjarætlanini, men 8,2 mió. kr. meira enn árið fyri. Munurin millum ætlan og framdar íløgur stavar fyri meginpartin frá íløgunum í vatn- og vindorku, hettar fyrst og fremst orsakað av, at íløguarbeiðini vóru sett í verk seinni enn ætlað, og at ætlað íløga í vindorku ikki gjørdist veruleiki.

## Serligir váðar

Felagið hevur avmarkaðan váða av einstøkum kundum, og felagið ansar støðugt eftir skuldarbindingini hjá kundum mótvegis felagnum.

Felagið er í ávísan mun viðkvæmt

fyri broytingum í rentustøði, men hevur valt ikki at tryggja móti rentuváða við rentupositiónum ella líknandi.  Verandi lán hava øll fasta rentu, eisini tann parturin, sum er byggilán til verkætlanina „Eiði 2“, har rentan skal endurskoðast við árslok 2013.

### Uttanhýsis umhvørvi

Felagið hevur fokus á umhvørvið, og leggur tí stóran dent á, at umhvørviskrøv og aðrar reglur og krøv á økinum til eina og hvørja tíð verða fylgd.

### Vitanarstøði

Felagið leggur stóran dent á, at hóskandi vitan og arbeiðsroyndir eru á øllum økjum í virkseminum. Í tann mun, hetta verður mett neyðugt, verður skipað fyri hóskandi eftirútbúgving av starvsfólki.

### Menning

Felagið arbeiðir framhaldandi við at menna veitingartrygdina og góðskuna. Arbeitt verður við ætlanum at økja tann partin av framleiðsluni, sum byggir á varandi orkukeldur so sum vatn, vind og sjóvarfall.

### Útlit fyri rakstrarárið 2011

Útlit eru fyri, at raksturin í 2011 fer kanska at javnviga áðrenn avskrivingar. Eftir avskrivingar verður talan um eitt munandi hall.

Inntøkan, sum fyri meginpartin byggir á selda elmegi og prísin fyri hesa, verður helst einar 39 mió. kr. hægri enn árið fyri, orsakað av elpríshækking uppá 15 oyra kWh. Hinvegin verða rakstrarútreiðslurnar helst eisini munandi hægri. Serstakliga verður roknað við munandi hægri útreiðslum til olju enn árið fyri.

Av útreiðslunum kann út frá oljuprísstøðinum í fyrsta kvartali í 2011 roknast við, at oljuútreiðslurnar verða einar 140 mió kr. ella einar 15 mió. kr. meira enn árið fyri. Við fyrivarni fyri oljuprísbroytingum og óvæntaðum skaðum ella øðrum óvart íkomnum rakstrarútreiðslum kann samanumtikið sigast, at rakstrarúrslitið í 2011 verður helst á sama lága støði sum í 2010. Hettar merkir eisini, at uttan fleiri elpríshækkingar verður einki gjaldførisavlop frá rakstrinum. Sostatt verður eingin eginfígging til ætlaðu íløgurnar. Harumframt verður neyðugt at lána pening til avdráttir av verandi lánum. Eitt úrslit við ongari eginfígging er ikki nøktandi, um SEV umframt at gera íløgur í endurnýggingar á dieselverkunum og útbygging av netinum eisini skal fremja íløgur í útbygging av varandi orkukeldum.

### Hendingar eftir roknskaparlok

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki hent, sum ávirkar metingina av ársfrásøgnini.

# Nýttur roknskaparháttur

## Alment
Ársfrásøgnin er gjørd í samsvar við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri miðal stór feløg í C-flokkinum. Nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur samanborið við undanfarna ár.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundað til heil tøl uttan desimalir. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

## Alment um innrokning og máting
Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar so hvørt sum tær verða forvunnar, harundir virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allar útreiðslur, harav av- og niðurskrivingar innroknaðar.

Í fíggjarstøðuni verða ognir innroknaðar, tá tað er sannlíkt, at framtíðar fíggjarligir fyrimunir fara at koma felagnum til góðar, og virði av ognini verður mett álítandi. Skuld verður innroknað í fíggjarstøðuna, tá hon er sannlík og kann mátast álítandi. Ogn og skuld verða innroknað til kostprís, og eftir hetta verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur, sum lýst niðanfyri.

Við innrokning og máting verður atlit tikið til væntað tap og váðar, ið vísa seg áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum kunnu sanna ella avsanna viðurskifti, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## UMROKNING AV ÚTLENDSKUM GJALDOYRA OG KURSTRYGGJAN
Ársfrásøgnin er í donskum krónum.

Leypandi verða transaktiónir í útlendskum gjaldoyra umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á transaktiónsdegnum. Áogn, skuld og aðrir moneterir postar í útlendskum gjaldoyra verða umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni. Staðfestur og ikki staðfestur vinningur ella tap av umrokning av útlendskum gjaldoyra verður innroknað í rakstrarroknskapin undir fíggjarligum postum.

## RAKSTRARROKNSKAPUR

### Nettosøla
Inntøkur við sølu av vørum og tænastum verða tiknar við í rakstrarroknskapin, um veiting er farin fram, og keyparin hevur yvirtikið váðan fyri árslok. Nettosølan verður mátað uttan MVG.

### Útreiðslur
Hesin postur umfatar kostnað í samband við keyp av vindorku, olju, tilfar, og aðrar tænastuveitingar, umframt annan fyristingarkostnað.

### Avskrivingar
Avskriving og amortisering av materiellari støðisogn verður løgd soleiðis til rættis, at tað fer fram ein skipað avskriving av støðisognini grundað á eina meting av brúkstíðini. Materiell støðisogn er tikin upp til kostprís, og avskrivað verður liniert. Avskrivingartíðin er frá 3 til 50 ár.

### Fíggjarpostar
Sum fíggjarpostar verða innroknaðar rentuinntøkur, rentuútreiðslur, staðfestur og óstaðfestur kursvinningur og –tap av virðisbrøvum, skuld og flyting í fremmandum gjaldoyra, amortisering av fíggjarligum aktivum og skyldum umframt rentuútreiðslur. Fíggjarinntøkur og fíggjarligir kostnaðir verða innroknaðir við teimum upphæddum, sum hoyra roknskaparárinum til.

### Skattur
Skattur av ársúrslitinum, sum fevnir um aktuellan skatt fyri árið umframt broytingar í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapin við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum. Skattur viðvíkjandi møguligum bókingum beinleiðis á eginognina, verður innroknaður á eginognina. Tann skattur, sum verður førdur í rakstrarroknskapin, verður flokkaður sum ávikavist skattur av vanligum rakstri og skattur av óvanligum postum.

Broyting í útsettum skatti vegna broytt skattaprosent, verður innroknað í rakstrarroknskapin .

## FÍGGJARSTØÐA

### Materiell støðisogn
Materiell støðisogn verður mátað í fíggjarstøðuni til kostprís frádrigið samanløgdu avskrivingarnar ella til endurvinningarvirði, har hetta er lægri. Endurvinningarvirðið er virðið á ognini við framhaldandi nýtslu ella við sølu.

Kostprísurin verður roknaður sum beinleiðis og óbeinleiðis nýtsla av tilfari og løn.

Í sambandi við at nýggj elveitingarlóg varð sett í gildi 1. januar 2009, varð av Elveitingareftirlitinum kravt, at avskrivingarárarmálið á støðisognini skuldi broytast munandi, og hetta skuldi gerast aftur til upprunaliga útveganarárið, og hetta hevur viðført at materiella støðisognin er javnað pr. 1. januar 2009 við kr. 629.049.604.

## Vørugoymslur

Vørugoymslur verða mátaðar til kostprís eftir FIFOháttinum ella nettosøluvirðinum, har hetta er lægri.

Kostprísur fyri rávørur, hjálpitilfar og handilsvørur verður mátaður sum keypsprísur umframt kostnað, sum er beinleiðis knýttur at keypinum.

Kostprísur fyri lidnar vørur og fyri vørur undir framleiðslu verður mátaður sum virðið av beinleiðis og óbeinleiðis brúktum tilfari og løn.

## Áogn

Áogn verður mátað sum áljóðandi virði við frádrátti av møguligum tapsvanda grundað á eina meting av hvørjum einstøkum skuldara.

## Fíggjarlig støðisogn

Fíggjarlig støðisogn er virðisásett til útveganarvirði.

## Virðisbrøv (umferðarfæ)

Lánsbrøv eru upptikin til kursjavnað virði.

## Útsettur skattur

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av aktivum og skyldum. Útsettur skattur verður innroknaður við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi á statusdegnum. Útsett skattaaktiv, harundir skattavirðið av framfluttum skattligum hallum, verða innroknað til tað virði, aktivið kann væntast at kunna realiserast fyri.

## Aktuellur skattur

Skyldugur skattur og skattaaógn verða innroknað í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt viðvíkjandi undanfarnum árum.

## Skuld

Langfreistað skuld verður mátað í fíggjarstøðuni til kostprís, tá skuldin verður stovnað. Skuldin verður hereftir innroknað til amortiseraðan kostprís. Kurstap og lánsútreiðslur verða býttar sundur yvir afturgjaldstíðina við støði í roknaðu effektivu rentuni tann dagin skuldin varð stovnað.

Stuttfreistað skuld verður mátað til amortiseraðan kostprís, og hetta svarar vanliga eisini til áljóðandi virði.

## Skyldug eftirløn

Eftirlønarskyldur verða avsettar sambært útrokning frá aktuari.

## Eginogn

Elfelagið SEV er eitt interkommunalt lutafelag, har allar kommunur í Føroyum eru limir. Eginognin hjá teimum einstøku kommunum verður við árslok gjørd upp í mun til íbúgvaratalið.

## LYKLATØL

Hesi eru útroknað sambært tilmælum frá „Den Danske Finansanalytikerforening“.

## PENGASTREYMSUPPGERÐ

Pengastreymsuppgerðin verður uppsett eftir óbeinleiðis háttinum og vísur pengastreymin hjá felagnum fyri roknskaparárið býttan á rakstur, íløguvirksemi og fíggingarvirksemi, broytingar í tøkum peningi við ársbyrjan og ársenda.

Pengastreymar frá rakstri umfatað ársins úrslit av rakstrinum tillagað fyri ikki likvidar rakstrarpostar, broyting í rakstrarkapitali og goldnan skatt.

Pengastreymur frá íløguvirksemi umfatar reguleringar fyri gjøld í samband við keyp og sølu immateriellum og materiellum støðisognum umframt keyp og sølu av feløgum.

Pengastreymur frá fíggingarvirksemi umfata fígging frá og vinningsbýti til partaeigarar. Harafturat umfatar pengastreymurin eisini upptøku av lánum og avdráttir av langfreistaðari skuld.

Tøkur peningur er tað, sum felagið hevur í tøkum peningi og stuttfreistaðum virðisbrøvum, sum uttan hóvasták kunnu umsetast til tøkan pening. Her er talan um virðisbrøv, har vandin fyri virðisbroytingum er ógvuliga avmarkaður.

# Rakstrarroknskapur

| | Nota | 2010 | *tkr.*<br>*2009* |
|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | 1,2 | **280.815.837** | ***279.870*** |
| Vindorkukeyp | 2-4 | -2.552.822 | *-2.700* |
| Oljuútreiðslur | 2-4 | -125.258.030 | *-75.854* |
| Tilfar og tænastuveitingar | 2-4 | -79.922.232 | *-69.757* |
| Lønir | 2-6 | -65.061.358 | *-62.277* |
| **Útreiðslur tilsamans** | | **-272.794.442** | ***-210.587*** |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | | **8.021.395** | **69.282** |
| Avskrivingar | 2-5,9 | -55.665.481 | *-54.815* |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar og skatt** | | **-47.644.086** | ***14.467*** |
| Fíggjarpostar, netto | 8 | -10.138.601 | *-5.210* |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **-57.782.687** | ***9.257*** |
| Skattur | 7 | 0 | *0* |
| **Ársúrslit** | | **-57.782.687** | ***9.257*** |
| **Býti av ársúrsliti** | | | |
| Flutt úrslit | | 941.423.298 | *321.847* |
| Javning til primo | | 1.350.545 | *610.319* |
| Ársúrslit | | -57.782.687 | *9.257* |
| **Tilsamans** | | **884.991.156** | ***941.423*** |
| **Skotið verður upp at býta upphæddina soleiðis** | | | |
| Flutt úrslit | | 884.991.156 | *941.423* |
| **Tilsamans** | | **884.991.156** | ***941.423*** |

# Kapitalfrágreiðing

| (1.000 kr.) | 2010 | *2009* |
|---|---|---|
| Ársúrslit | -57.783 | *9.257* |
| Aðrir postar | 2.082 | *0* |
| Avskrivingar | 55.665 | *54.815* |
| **Likviditetsbroyting frá rakstri** | **-36** | ***64.072*** |
| | | |
| Broyting skuldarar | -2.533 | *359* |
| Broyting stuttfreistað skuld | 33.938 | *-9.144* |
| Broyting goymsla olja | -19.928 | *-10.086* |
| Broyting goymsla tilfar | -620 | *-1.038* |
| | **10.821** | ***44.163*** |
| | | |
| Støðisogn, broyting í arbeiði í gerð | -78.826 | *-71.856* |
| Partabrøv | 0 | *0* |
| Goldnir avdráttir og lántøka | 72.025 | *40.158* |
| Javning til primo | 1.351 | *0* |
| **Likviditetsbroyting** | **5.371** | ***12.465*** |
| | | |
| Kassa- og bankapeningur primo | 36.765 | *24.268* |
| Lánsbrøv primo | 7 | *39* |
| **Likviditetur ultimo** | **42.143** | ***36.772*** |
| | | |
| **Likviditetur ultimo:** | | |
| Kassa- og bankapeningur | 42.143 | *36.765* |
| Lánsbrøv | 0 | *7* |
| | **42.143** | ***36.772*** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| AKTIV | Nota | 2010 | tkr. 2009 |
|---|---|---|---|
| Fastar ognir, elverk v.m. | 2,3,4,5,9 | 993.144.757 | *1.021.504* |
| Íløguarbeiði í gerð | | 64.383.602 | *12.822* |
| **Materiell støðisogn** | | **1.057.528.359** | ***1.034.326*** |
| Partapeningur | | 2.850.000 | *4.975* |
| **Fíggjarlig støðisogn** | | **2.850.000** | ***4.975*** |
| **STØÐISOGN TILSAMANS** | | **1.060.378.359** | ***1.039.301*** |
| Olja á goymslu | | 38.483.020 | *18.555* |
| Tilfar á goymslu | | 11.714.441 | *10.937* |
| Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning | | 19.250 | *176* |
| **Goymslur tilsamans** | | **50.216.711** | ***29.668*** |
| Elskuldarar | 10 | 32.144.433 | *32.724* |
| Skuldarar aðrir | | 4.227.267 | *3.745* |
| Onnur áogn | | 11.443.840 | *8.813* |
| **Skuldarar tilsamans** | | **47.815.540** | ***45.282*** |
| Lánsbrøv | | 312 | *7* |
| **Virðisbrøv** | | **312** | ***7*** |
| **Tøkur peningur** | | **42.143.305** | ***36.765*** |
| **OGN Í UMFERÐ TILSAMANS** | | **140.175.868** | ***111.722*** |
| **AKTIV TILSAMANS** | | **1.200.554.227** | ***1.151.024*** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| PASSIV | Nota | 2010 | tkr. 2009 |
|---|---|---|---|
| Innskot | | 4.139.875 | *4.140* |
| Kapitalkonto | | 884.991.156 | *941.423* |
| **EGINOGN TILSAMANS** | 11 | **889.131.031** | ***945.563*** |
| Avsetingar til skylduga eftirløn | | 18.730.552 | *18.731* |
| Útsettur skattur | 7 | 0 | *0* |
| **Avsetingar tilsamans** | | **18.730.552** | ***18.731*** |
| Lán | 12 | 217.979.636 | *145.955* |
| **Langfreistað skuld** | | **217.979.636** | ***145.955*** |
| Elognarar | 13 | 20.271.361 | *18.683* |
| Aðrir ognarar | | 48.484.281 | *19.472* |
| Onnur skuld | | 5.957.366 | *2.621* |
| **Stuttfreistað skuld** | | **74.713.008** | ***40.775*** |
| **SKULD TILSAMANS** | | **292.692.644** | ***186.730*** |
| **PASSIV TILSAMANS** | | **1.200.554.227** | ***1.151.024*** |
| Veðsetingar | 14 | | |

# Frágreiðing um eginogn

| Allar upphæddir í tkr. | Innskot | Fluttur vinningur | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Eginogn 01.01.2009 | 4.140 | 321.847 | 325.987 |
| Javning til primo | 0 | 610.319 | 610.319 |
| Javnað eginogn primo | 4.140 | 932.166 | 936.306 |
| Ársins úrslit | 0 | 9.257 | 9.257 |
| **Eginogn 31.12.2009** | **4.140** | **941.423** | **945.563** |
| Eginogn 01.01.2010 | 4.140 | 941.423 | 945.563 |
| Javning til primo | 0 | 1.351 | 1.351 |
| Javnað eginogn primo | 4.140 | 942.774 | 946.914 |
| Ársins úrslit | 0 | -57.783 | -57.783 |
| **Eginogn 31.12.2010** | **4.140** | **884.991** | **889.131** |

| Útgreining av broytingum í innskoti | 2010 | 2009 | 2008 | 2007 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|
| Innskot við ársbyrjan | 4.140 | 4.140 | 4.140 | 4.140 | 4.140 |
| Hækking innskot | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **4.140** | **4.140** | **4.140** | **4.140** | **4.140** |

| 1. Inntøkur | 2010 | *tkr.* *2009* |
|---|---|---|
| kWh-gjald o.a | 261.844.700 | *260.278* |
| Fast gjald | 16.105.115 | *16.380* |
| Íbinding | 1.579.190 | *2.094* |
| Ómaks- og áminningargjøld og onnur søla | 1.286.832 | *1.118* |
| | **280.815.837** | ***279.870*** |

**2. Virkisbýti**

| Rakstur | | | 2010 | | | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **tkr.** | **Framleiðsla** | **Net** | **Tilsamans** | **Framleiðsla** | **Net** | **Tilsamans** |
| **Inntøkur** | - | 280.816 | 280.816 | *-* | *279.870* | *279.870* |
| Framleiðslubýti | 2 38.266 | -238.266 | - | *184.825* | *-184.825* | *-* |
| Vindorkukeyp | - | -2.553 | -2.553 | *-* | *-2.700* | *-2.700* |
| Oljuútreiðslur | -124.731 | -527 | -125.258 | *-75.624* | *-229* | *-75.853* |
| Tilfar og tænastuveitingar | -46.416 | -33.507 | -79.923 | *-40.495* | *-29.262* | *-69.757* |
| Lønir | -31.103 | -33.958 | -65.061 | *-32.878* | *-29.399* | *-62.277* |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | 36.016 | -27.995 | 8.021 | *35.828* | *33.455* | *69.283* |
| Avskrivingar | -31.306 | -24.359 | -55.665 | *-30.771* | *-24.044* | *-54.815* |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar og skatt** | 4.710 | -52.354 | -47.644 | *5.057* | *9.411* | *14.468* |
| Fíggjarpostar, netto | -4.710 | -5.429 | -10.139 | *-5.057* | *-154* | *-5.211* |
| **Úrslit áðrenn skatt** | - | -57.783 | -57.783 | *-* | *9.257* | *9.257* |
| Skattur | - | - | - | *-* | *-* | *-* |
| **Ársúrslit** | **-** | **-57.783** | **-57.783** | ***-*** | ***9.257*** | ***9.257*** |

# Notur til ársfrásøgn

| AKTIV | | 2010 | | | 2009 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| tkr. | Framleiðsla | Net | Tilsamans | Framleiðsla | Net | Tilsamans |
| Fastar ognir, elverk v.m. | 574.157 | 418.988 | 993.145 | *596.153* | *425.351* | *1.021.504* |
| Íløguarbeiði í gerð | 54.384 | 10.000 | 64.384 | *11.347* | *1.475* | *12.822* |
| **Materiell støðisogn** | **628.541** | **428.988** | **1.057.529** | ***607.500*** | ***426.826*** | ***1.034.326*** |
| Partapeningur | - | 2.850 | 2.850 | *-* | *4.975* | *4.975* |
| **Fíggjarlig støðisogn** | **-** | **2.850** | **2.850** | ***-*** | ***4.975*** | ***4.975*** |
| **STØÐISOGN TILSAMANS** | **628.541** | **431.838** | **1.060.379** | ***607.500*** | ***431.801*** | ***1.039.301*** |
| Olja á goymslu | - | 38.483 | 38.483 | *-* | *18.555* | *18.555* |
| Tilfar á goymslu | - | 11.714 | 11.714 | *-* | *10.937* | *10.937* |
| Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning | - | 19 | 19 | *-* | *176* | *176* |
| **Goymslur tilsamans** | **-** | **50.216** | **50.216** | ***-*** | ***29.668*** | ***29.668*** |
| Elskuldarar | - | 32.144 | 32.144 | *-* | *32.724* | *32.724* |
| Skuldarar aðrir | - | 4.228 | 4.228 | *-* | *3.745* | *3.745* |
| Onnur áogn | - | 11.444 | 11.444 | *-* | *8.813* | *8.813* |
| **Skuldarar tilsamans** | **-** | **47.816** | **47.816** | ***-*** | ***45.282*** | ***45.282*** |
| Lánsbrøv | - | - | - | *-* | *7* | *7* |
| **Virðisbrøv** | **-** | **-** | **-** | ***-*** | ***7*** | ***7*** |
| **Tøkur peningur** | **-** | **42.143** | **42.143** | ***-*** | ***36.765*** | ***36.765*** |
| **OGN Í UMFERÐ TILSAMANS** | **-** | **140.175** | **140.175** | ***-*** | ***111.722*** | ***111.722*** |
| **AKTIV TILSAMANS** | **628.541** | **572.013** | **1.200.554** | ***607.500*** | ***543.523*** | ***1.151.023*** |
| **PASSIV** | | | | | | |
| Innskot | - | 4.140 | 4.140 | *-* | *4.140* | *4.140* |
| Kapitalkonto | 410.561 | 474.430 | 884.991 | *467.932* | *473.491* | *941.423* |
| **Eginogn tilsamans** | **410.561** | **478.570** | **889.131** | ***467.932*** | ***477.631*** | ***945.563*** |
| Avsetingar til skylduga eftirløn | - | 18.731 | 18.731 | *-* | *18.730* | *18.730* |
| Útsettur skattur | - | - | - | *-* | *-* | *-* |
| **Avsetingar tilsamans** | **-** | **18.731** | **18.731** | ***-*** | ***18.730*** | ***18.730*** |
| Lán | 217.980 | - | 217.980 | *139.568* | *6.388* | *145.956* |
| Elognarar | - | 20.271 | 20.271 | *-* | *18.682* | *18.682* |
| Aðrar ognarar | - | 48.484 | 48.484 | *-* | *19.472* | *19.472* |
| Onnur skuld | - | 5.957 | 5.957 | *-* | *2.620* | *2.620* |
| **Skuld tilsamans** | **217.980** | **74.712** | **292.692** | ***139.568*** | ***47.162*** | ***186.730*** |
| **PASSIV TILSAMANS** | **628.541** | **572.013** | **1.200.554** | ***607.500*** | ***543.523*** | ***1.151.023*** |

### 3. Framleiðsla

| tkr. | Egin framleiðslubýti | Oljuútreiðslur | Tilfar | Lønir | Fíggjarpostar | Avskriving |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fossaverkið | 22.274 | -40 | -18.874 | -2.978 | - | -381 |
| Heygaverkið | 845 | - | -276 | -271 | - | -298 |
| Mýruverkið | 3.450 | - | -2.590 | -470 | - | -389 |
| Eiðisverkið | 21.335 | - | -3.020 | -1.250 | -4.710 | -12.356 |
| Verkið í Botni | 1.203 | -10 | -534 | -330 | - | -330 |
| Vágsverkið | 23.275 | -11.911 | -3.356 | -5.689 | - | -2.319 |
| Verkið á Tvøroyri | 513 | - | -238 | -111 | - | -165 |
| Sundsverkið | 151.581 | -108.825 | -14.622 | -15.599 | - | -12.536 |
| Skopun | 721 | -86 | -240 | -145 | - | -251 |
| Verkið KG | 4.970 | -2.409 | -557 | -1.539 | - | -465 |
| Vindmyllan 150 kW | 93 | - | -32 | -61 | - | - |
| Vindmyllan 750 kW | 1.821 | - | -494 | -170 | - | -1.156 |
| Vindorkutøkni | 135 | - | -86 | -49 | - | - |
| Smáverk (felagsarb. KG) | 82 | - | -52 | -30 | - | - |
| Mobilaggregat | 399 | -25 | -89 | -190 | - | -95 |
| Fugloy | 1.604 | -472 | -446 | -529 | - | -156 |
| Svínoy | 715 | -22 | -90 | -406 | - | -196 |
| Mykines | 959 | -284 | -199 | -464 | - | -11 |
| Hestur | 78 | - | -2 | -76 | - | - |
| Koltur | 367 | -124 | -131 | -112 | - | - |
| Nólsoy | 86 | - | -6 | -80 | - | - |
| Skúvoy | 1.163 | -383 | -218 | -438 | - | -124 |
| Dímun | 597 | -140 | -262 | -116 | - | -78 |
| **Framleiðsluúrslit** | **238.266** | **-124.731** | **-46.414** | **-31.103** | **-4.710** | **-31.306** |

### 4. Netvirksemi

| tkr. | Inntøkur | Egin fr.býti | Vindorka | Oljútr. | Tilfar | Lønir | Fígg.postar | Avskr. | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Søla | 280.816 | -238.266 | - | - | - | - | - | - | 42.550 |
| Koblingsstøðir | - | - | - | - | -786 | -448 | - | -2.673 | -3.907 |
| Býtisvirkir | - | - | - | -369 | -14.129 | -15.057 | - | -17.701 | -47.256 |
| Innlegging | - | - | - | - | -903 | -3.389 | - | -863 | -5.155 |
| Verkfrøði | - | - | - | - | -1.977 | -3.347 | - | -32 | -5.356 |
| Teknikk | - | - | - | - | -675 | -1.287 | - | -55 | -2.017 |
| Fyrisiting | - | - | -2.553 | -158 | -19.328 | -12.617 | -5.429 | -3.035 | -43.120 |
| **Net tils.** | **280.816** | **-238.266** | **-2.553** | **-527** | **-37.798** | **-36.145** | **-5.429** | **-24.359** | **-64.261** |
| Fordeilt tilfar | - | - | - | - | 4.292 | - | - | - | 4.292 |
| Fordeild løn | - | - | - | - | - | 2.187 | - | - | 2.187 |
| **Net fordeilt tils.** | **280.816** | **-238.266** | **-2.553** | **-527** | **-33.506** | **-33.958** | **-5.429** | **-24.359** | **-57.782** |

### 5. Fyrisiting

| tkr. | Vindorka | Oljútr. | Tilfar | Lønir | Fígg.postar | Avskr. | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Aðalfundur og nevnd | - | - | 253 | 945 | - | - | 1.198 |
| Arbeiðsmarkn. gjøld | - | - | - | - | - | - | - |
| Kanning og ráðgeving | - | - | 3.963 | 106 | - | - | 4.069 |
| Kunningartøkni | - | - | 3.041 | - | - | 24 | 3.065 |
| Leiðsla & skrivstovuhald | - | - | 1.798 | 9.172 | - | 11 | 10.981 |
| Orkuráðgeving | - | - | 47 | 367 | - | - | 414 |
| Tænastumannaeftirløn | - | - | - | 781 | - | - | 781 |
| Tap uppá skuldarar | - | - | 4.553 | - | - | - | 4.553 |
| Aðrar fyrisitingarútr. | 2.553 | 158 | 5.673 | 1.245 | 5.429 | 3.001 | 18.059 |
| **Fyrisiting tils.** | **2.553** | **158** | **19.328** | **12.616** | **5.429** | **3.036** | **43.120** |
| Fordeilt tilfar | - | - | -4.292 | - | - | - | -4.292 |
| Fordeild løn | - | - | - | -2.573 | - | - | -2.573 |
| **Fyrisiting fordeilt tils.** | **2.553** | **158** | **15.036** | **10.043** | **5.429** | **3.036** | **36.255** |

### 6. Starvsfólkakostnaður

| | Framleiðsla | Net | tils. 2010 | *tkr. 2009* |
|---|---|---|---|---|
| Lønir | 28.093.458 | 29.026.618 | 57.120.076 | *59.088* |
| Eftirlønir | 2.221.016 | 3.788.525 | 6.009.541 | *5.718* |
| Almenn gjøld | 788.785 | 1.142.957 | 1.931.742 | *1.446* |
| **Tilsamans** | **31.103.259** | **33.958.100** | **65.061.358** | ***66.252*** |
| Samsýning til stjórn og nevnd | | | 2.038.718 | *1.871* |
| Miðaltal av starvsfólki | | | 146 | *153* |

### 7. Skattur

| | 2010 | *tkr. 2009* |
|---|---|---|
| Aktuellur skattur | 0 | *0* |
| Útsettur skattur | 0 | *0* |
| **Skattir tilsamans** | **0** | ***0*** |
| **Útsettur skattur** | | |
| Avsett primo | 0 | *0* |
| Broyting í útsettum skatti í árinum | 0 | *0* |
| **Avsett við árslok** | **0** | ***0*** |

### 8. Fíggjarpostar

| | 2010 | *tkr. 2009* |
|---|---|---|
| Rentuútreiðslur | 8.699.429 | *5.682* |
| Niðurskriving partabrøv í atknýttum virki | 2.125.168 | *0* |
| Rentuinntøkur | -685.996 | *-472* |
| | **10.138.601** | ***5.210*** |

### 9. Fastar ognir og avskrivingar

| tkr. | Framleiðslu virkir | Bygningar og jarðarognir | Býtisvirkir | Rakstrargøgn |
|---|---|---|---|---|
| Útveganarvirði við ársbyrjan | 1.269.230 | 65.320 | 686.070 | 117.730 |
| Tilgongd, netto | 9.311 | 0 | 13.095 | 4.900 |
| **Útveganarvirði við ársenda** | **1.278.541** | **65.320** | **699.165** | **122.630** |
| | | | | |
| Avskrivingar við ársbyrjan | -673.078 | -23.513 | -315.510 | -104.746 |
| Avskrivingar í árinum | -31.306 | -1.221 | -19.976 | -3.162 |
| **Avskrivingar við ársenda** | **-704.384** | **-24.734** | **-335.486** | **-107.908** |
| | | | | |
| **Bókað virði við ársenda** | **574.157** | **40.586** | **363.679** | **14.722** |

### 10. Elskuldarar

| | 2010 | *tkr.* *2009* |
|---|---|---|
| Gjaldkomið í roknskaparárinum: | | |
| Vanligir brúkarar | 746.024 | *2.992* |
| Max. brúkarar | 3.046.545 | *2.453* |
| | **3.792.569** | ***5.445*** |
| | | |
| Ikki gjaldkomið: | | |
| Vanligir brúkarar | 19.283.412 | *23.556* |
| Max. brúkarar | 11.218.452 | *4.924* |
| | **30.501.864** | ***28.479*** |
| | | |
| **Sett av til tap av elskuldarum** | **-2.150.000** | ***-1.200*** |
| | | |
| **Elskuldarar tilsamans** | **32.144.433** | ***32.724*** |

### 11. Sundurgreining av eginogn

| | KOMMUNU INNSKOT | EGINOGN 31.12.2010 | EGINOGN 31.12.2009 |
|---|---|---|---|
| Hvannasund | 36.375 | 7.796.024 | *8.417.659* |
| Klaksvík | 520.250 | 88.135.331 | *93.697.258* |
| Fugloy | 17.500 | 695.420 | *735.336* |
| Viðareiði | 25.250 | 6.368.583 | *6.869.584* |
| Kunoy | 12.625 | 2.562.074 | *2.941.343* |
| Húsar | 17.500 | 988.228 | *1.103.004* |
| Eiði | 78.625 | 12.279.653 | *12.887.727* |
| Sunda | 177.367 | 30.378.872 | *31.948.404* |
| Fuglafjørður | 136.250 | 27.999.804 | *29.723.046* |
| Eystur | 146.500 | 36.180.139 | *37.966.547* |
| Nes/Runavík | 332.133 | 93.277.778 | *97.993.167* |
| Sjógv | 92.875 | 17.568.504 | *19.447.696* |
| Kvívík | 59.125 | 10.724.108 | *11.494.459* |
| Vestmanna | 125.250 | 22.033.833 | *23.008.269* |
| Vága | 169.625 | 35.503.019 | *37.598.879* |
| Sørvágur | 127.500 | 20.624.692 | *22.079.424* |
| Sandur | 72.250 | 10.193.393 | *10.797.825* |
| Skopun | 71.000 | 8.601.247 | *9.404.558* |
| Skálavík | 30.750 | 2.964.685 | *3.173.554* |
| Húsavík | 25.125 | 2.287.566 | *2.438.219* |
| Skúvoy | 17.875 | 823.524 | *986.898* |
| Hvalba | 103.625 | 13.029.974 | *13.990.731* |
| Tvøroyri | 255.250 | 31.586.707 | *33.728.691* |
| Fámjin | 23.125 | 1.976.457 | *2.089.902* |
| Hov | 22.875 | 2.196.063 | *2.341.464* |
| Porkeri | 51.000 | 5.746.365 | *6.347.109* |
| Vágur | 218.375 | 25.218.124 | *26.394.684* |
| Sumba | 81.375 | 6.643.091 | *7.295.305* |
| Tórshavn | 1.092.500 | 364.747.773 | *384.522.556* |
| | **4.139.875** | **889.131.031** | ***941.423.298*** |

### 12. Lán

Skuld felagsins fellur til gjaldingar á fylgjandi hátt:

| | tkr. 2010 |
|---|---|
| Innan 1 ár | 15.859 |
| Millum 1 og 5 ár | 41.857 |
| Aftaná 5 ár | 10.263 |

Lán frá Íleggingargrunnurin fyri Føroyar á kr. 150 mió. er veitt til fígging av „Eiði 2 – suður" verkætlanini og 3. turbinuni á Eiðisverkinum. Hesi arbeiði eru í gerð, og verður lánið hækkað til kr. 178 mió. í 2011, og til kr. 218 mió. í 2012. Eftir avtaluni við Íleggingargrunnin verður afturgjaldstíðin 14 ár, og skal afturgjaldingin byrja í 2014.

### 13. Elognarar kr. 20.271.361

Hetta er skuld til brúkarar, ið hava brúkt minni streym, enn teir hava goldið a conto fyri, og sum tí eiga pening tilgóðar hjá SEV.

### 14. Veðsetingar

Ognir felagsins eru veðsettar fyri tilsamans kr. 218 mió.


Motororkuverk
Vatnorkuverk
60kV Koblingsstøð
Vindorka
60kV
20kV
10kV
6kV
Sjókaðal

Elfelagið SEV · Boks 319 · FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 34 68 00 · Fax +298 34 68 01
sev@sev.fo · www.sev.fo